a

# GERÐABÓK

**Dato:** 23. oktober 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 216/25-237/25

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen
Sunnvá Dahl Høgfeldt

**LUTTÓKU EISINI:**
Hermann Mortensen
Eyðfríð Jacobsen
Fríður Dalsgarð
David Andresen
Øssur Patursson
Birita í Dali

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Havmand

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 216/25 | 25/09583-1 | Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býaráðfundi 23. oktober 2025 | 661 |
| 217/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 662 |
| 218/25 | 25/08389-3 | Matr.nr. 255de, Kirkjubøur - Argir. Umsókn um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum við sethúsum í ger. | 664 |
| 219/25 | 25/08814-2 | Matr.nr. 1175f, Tórshavn. Leigumál millum Búnaðarstovuna og Tórshavnar kommunu. Lendi til Vatnbrunn. | 666 |
| 220/25 | 25/05986-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924 | 668 |
| 221/25 | 25/08905-1 | Umbøn um eykajáttan í sambandi konto 2617 | 674 |
| 222/25 | 25/04377-1 | Býarskipan 2025 | 676 |
| 223/25 | 25/04323-2 | Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 5.1 - 23/06318 | 683 |
| 224/25 | 25/08620-1 | Menning av Vágsbotni - 22/01036 | 687 |
| 225/25 | 25/08816-1 | Skipan av býlingum við Stórutjørn | 690 |
| 226/25 | 25/02294-3 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn | 694 |
| 227/25 | 25/01098-6 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes - 22/04933 | 698 |
| 228/25 | 25/04664-4 | Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir | 702 |
| 229/25 | 25/04465-1 | Nýggj byggisamtykt fyri Koltur | 710 |
| 230/25 | 25/08473-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við A.C. Evensgøtu, Sólteig og Djóna í Geilgøtu, matr. nr. 704a, 703c, 703d, 705q, 705x, 705f, 705d og 705c, Tórshavn | 712 |
| 231/25 | 25/05298-1 | Ábøtur á Gerðisbreyt á Velbastað | 715 |
| 232/25 | 25/07379-1 | Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún" | 718 |
| 233/25 | 25/03157-2 | Broyting í reglugerðini fyri útlutan av grundstykkjum til sethús | 723 |
| 234/25 | 25/03158-1 | Dagføring av innkeyps- og útboðspolitikki hjá Tórshavnar kommunu | 725 |
| 235/25 | 25/06020-1 | Fíggjarætlan 2026, Tórshavnar kommuna | 727 |
| 236/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 734 |
| 237/25 | 25/05840-2 | Heimild til byggimálsdeildina | 737 |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. oktober 2025 | Blað nr.: 661<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Til viðgerðar**

## 216/25 Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býaráðfundi 23. oktober 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 216/25 | 25/09583-1 |

**Málslýsing:**
Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Sunnvá Dahl Høgfeldt, eru loknar.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 217/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 96/25 | 25/00163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 120/25 | 25/00163-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 144/25 | 25/00163-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 177/25 | 25/00163-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 217/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

| | Býráðsfundur<br>23. oktober 2025 | Blað nr.: 663 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið til eftirtektar.

## 218/25 Matr.nr. 255de, Kirkjubøur - Argir. Umsókn um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum við sethúsum í ger.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 172/25 | 25/08389-3 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 218/25 | 25/08389-3 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá eigarum.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 255de, Kirkjubøur,Argir. Skeytið tinglýst 25.06.2020.

Hús eru ábygd á grundstykkinum, men eru ikki liðug. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av ognini. Sí teldubræv skjal. 25/08389 – 1.

**Lógir, ásetingar o.a**.

**Grein 7**, í skeytinum ásetur, at keyparin hevur ikki loyvið til at selja stykkið víðari, fyrr enn egin sethús til privatan bústað eru bygd á stykkinum, og keyparin hevur búð í privatu húsunum í 3 ár. Tórshavnar býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur.

**Grein 6**, í skeytinum ásetur, at byggingin skal vera byrja innan 2 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagið 3 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Annars tilskilar kommunan sær rætt til at krevja stykkið aftur móti, at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.
Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Eigarans frágreiðing um húsini.
Úti eru húsini sum so liðug. Húsini eru bygd við betong sandwich-elementum. Veggir í garsjuni eru timburveggir.
Tekjan er betong holdekk sum er bjálvað við 230 mm batts. Síðani er takdúkur omaná.
Millum hæddirnar er eisini Betongdekk.

Gólvhiti er lagdur í øll gólvini. Einki er gjørt við HVS. Øll kloakk er liðug og íbundin. EL er lagt í lættar innveggir sum síggjast á myndum.
Næstan allir veggir eru reistir á ovaru hæddin.

Víðarisølu av ognini í fríari sølu krevur tilsøgn frá Tórshavnar kommunu.

Ein annar valmøguleiki er, at Tórshavnar kommuna krevur grundøkið við sethúsum í ger, innaftur, vísandi til at eigarin ikki ætlar at byggja húsini liðug. Tórshavnar kommuna skal tá sambært skeytisásetingunum rinda endurgjald fyri tað sum er bygt á ognini. Tórshavnar kommuna hevði við hesi loysn samstundis tikið á seg tann váða, ið liggur í at yvirtaka ófullfíggjaða húsaogn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at loyva eigaranum at selja ognina víðari í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

# 219/25 Matr.nr. 1175f, Tórshavn. Leigumál millum Búnaðarstovuna og Tórshavnar kommunu. Lendi til Vatnbrunn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 173/25 | 25/08814-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 219/25 | 25/08814-2 |

**Upprunin til málið.** Verandi leigusáttmáli við Búnaðarstovuna er útgingin, og er avtalað við Búnaðarstovuna, at nýggjur leigusáttmáli verður undirskrivaður partanna millum galdandi í 3 ár.

**Lýsing av málinum**
Búnaðarstovan hevur sent kommununi uppskot til nýggjan leigusáttmála, sum umfatar undirlendið undir gamla vatnbrunninum sum er staðsettur á matr.nr. 1175f, Tórshavn. Lendið er partur av Húsahaga matr.nr. 1175a. Lendið er til víddar 3.646 m².

Leigusáttmálin er galdandi fyri tíðarskeiðið 1. apríl 2025 og endar uttan aðra fráboðan tann 01. apríl 20.2028. Leigugjald er kr. 5.700 pr. ár. At rinda forút hin 01. Desember.
Sambært § 5 í sáttmálanum, tekur leigumálið við, tá sáttmálin er undirskrivaður, og sambært stk. 2. Er áramálið fyri sáttmálanum 3 ár. Leigarin kann søkja um at endurnýggja leigumálið, tá hetta er við at ganga út.

Búnaðarstovan ynskir at verandi sáttmáli sum er útgingin, verður formaliseraður í nýggjum leigusáttmála.

Vatnmeistarin, Bjørn Holm, vísir á, at Tórshavnar kommuna hevur tørv á brunninum og økinum, har brunnurin stendur. Í løtuni er brunnurin ikki virkin, men er ætlanin at fáa hann í rakstur aftur.

Nógv bygging er ætlað Millum Horna, við Heimasta Horn, við Kerjagøtu og aðrastaðni, har vatnleiðingin frá brunninum verður brúkt, tá tørvurin gerst størri, og gerst tað tá meira viðkomandi at fáa brunnin í rakstur aftur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Skjøl.**
Leigusáttmáli 25/08814–1
Kort 25/08814-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Býráðsfundur<br>23. oktober 2025 | Blað nr.: 667<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 3 ár |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 5.700 |

**Tilmæli:**
Tekniskur stjóri, vatnmeistarin og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini til at skriva undir nýggjan leigusáttmála, um lendið undir kommunala vatnbrunninum í Húsahaga. Matr.nr. 1175f, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. oktober 2025 | Blað nr.: 668 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 220/25 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 77/25 | 25/05986-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 90/25 | 25/05986-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 135/25 | 25/05986-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 184/25 | 25/05986-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 220/25 | 25/05986-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekstur og tilfar kemur áðrenn fundin.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 2.251.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 2.251.000 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 71.185.391,65 |
| Áður játtað | Upphædd: | 68.935.343,38 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**
Fleiri avleiddar verkætlanir eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sum verða lýst niðanfyri. Talan er í høvuðsheitum um hesi arbeiði:

**Uttandura arbeiði**
*Stuðlaveggur,* sí skjal 1 & sí skjal A-C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6
*Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll,* sí skjal 2, j.nr. 25/05986-7
*Gøta, trappa í lendi og tvey portur til FIFA vøll,* sí skjal 2 j.nr. 25/05986-7 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-8
*Klæðing av rimaverki, sí skjal 2B, j.nr. 25/05986-9*
*Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum, veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10*
*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður,* sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

**Innandura arbeiði í verandi stovni**
*Køkur*
*Umbygging í verandi stovni*
*Skilaveggir, ovnar, køliskáp o.a.*
*Hæve/sænkeborð – broyting av skiftirúmum*
*Annað*
*Stuðlaveggur*
Avbjóðingar hava verið við lendisviðurskiftum og uttanumøkinum á eystanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Stórur hæddarmunur hevur verið við ovara benið og vegin. Fyri at økið kann vera trygt og at arbeiðið ikki verður steðgað upp hjá báðum arbeiðstakarum á staðnum, Búsetur og RTS, hevur verið neyðugt gera eykaarbeiðið á stuðlavegg framvið vegnum mótvegis økinum við Dagstovnin á Hamrinum. Umsitingin hevur verið í samráðingum við arbeiðstakaran, RTS, um at gera stuðlaveggin við uttanumøkið hjá Dagstovninum á Hamrinum, tí stuðlaveggurin liggur á arbeiðsøkinum hjá RTS. RTS hevur veitt tilboð á

hetta arbeiðið at gera stuðlavegg á 50 m, sum 2m høgur og 20cm tjúkkur, íroknað fundament til stuðlavegg 50 m x 0,4 m x 0,4 m. Verkætlanin L31011 hevur fyribils fíggjað hetta arbeiðið, sí skjal 1, skjal 1A, skjal 1B, skjal 1C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6.

Samlaður prísur fyri at hava gjørt hesi arbeiðið er áljóðandi tls.

| | |
|---|---|
| Tilboð á stuðlavegg (RTS) | 349.260,00 u/mvg |
| Prosjektering (LBF) | 20.366,75 u/mvg |
| Kvalitetsikring/eftirlit (LBF) | 5.205,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **374.831,75 u/mvg** |

*Umbygging og nýtsla av FIFA vølli við Dagstovnin á Hamrinum.*
Dagstovnurin á Hamrinum hevur tørv á at fáa eina loysn viðvíkjandi málinum um FIFA vøllin.
Manglandi atgongd til sparkivøllin skapar eina ótrygga støðu, tá skúlabørn skulu á vøllin í fríkorterum og tá børn í frítíðini spretta net meskarnar í málinum upp fyri at fáa atgongd. Tí er bráðfeingistørvur at fáa loysn á málinum.

Skúlin á Argjahamri hevur havt tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum.

Børnini í grannalagnum hava eisini tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum. Byggiprosjekt er sum nú er á staðnum, har byggihegn er sett rundanum vøllin og spæliplássið hjá dagstovninum er flutt, soleiðis at eingin atgongd er til vøllin, uttan gjøgnum høvuðsportrið til dagstovnin.

Umsitingin hevur verið í samskifti við Eigarafelagið á Hamrinum, sum FIFA vøllurin av fyrstani tíð hevur verið bygdur/ætlaður til. Loysnin á málið verður, at tá ið byggiprosjektið er liðugt verður rás, trappa í lendi og tvey portur eystanfyri FIFA vøllin gjørt til børnini á dagstovninum og hjá børnum í grannalagnum annars at nýta um kvøldarnar og í frítíðini sum heild, tá ið stovnurin er stongdur, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8

Eigarafelagið uppi á Hamrinum hevur viðmerkingar at bøta skaðan á verandi hegn rundanum og gera tvey portur, rás, trappu í lendi, sum framvíst, er ein nøktandi loysn.
Eigarafelagið viðmerkir kortini, at vøllurin ikki er í góðum standi, og at vøllurin tíðum er dekkaður við sandi í pørtum av vøllinum, soleiðis at mann ikki kann brúka vøllin. Ynskið er at fáa nýtt graslíki á vøllin og at ein betri loysn verður funnin við at eingin sandur kemur á vøllin, ella í munandi minni mát. Umsitingin hevur kannað málið saman við arbeiðstakaranum og er komin til ta loysn at skerma vøllin betri av frá plássinum við at klæða rimaverkið, soleiðis at børnini ikki sleppa at koyra sand inná vøllin, sí skjal 2B_Klæðing av rimaverki, j.nr. 25/05986-9.

Umsitingin somuleiðis biðið um tilboð á veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10.

*Afturbøting av verandi hegni við FIFA vøll*
Verandi hegn rundanum FIFA vøllin varð skatt í vetur. Umsitingin hevur biðið Búsetur kannað málið, hvat ið skilabest er at gera. Búsetur boða frá, at hegnið rundanum er sera høgt og viðbrekið og tað ber illani til at dimensionera og uppbyggja eitt fundament, sum tolir føroyska veðurlagi, tá ið hegni er somikið høgt. Fyri stoyping stórum fundamentum mugu gerast størri inntriv á vøllin og økið annars. Búsetur leggur upp til at seta skrástívarar í, afturbøta verandi pelar og at lækka hegni í til 4 metrar, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki við garði/stakitti*
Ynski er frá stovninum at fáa avskerma vøggustovuøkið og barnagarðsøkið við garði. Hetta hevur ikki verið við í prosjektinum. Búsetur hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið, áljóðandi 76.053,00 u/mvg, sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur at veita eitt samlað tilboð á ymisk arbeiðið við FIFA vøllin, sí sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

| | |
|---|---|
| Gera gøtu, trappu í lendi og tvey portur til FIFA vøll: | 106.024,00 u/mvg |
| Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll: | 108.000,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **261.614,24 u/mvg** |

**Innandura arbeiði**
Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur um at gera eina samlað loysn og heildartilboð á tilbygging av køki og goymslu í verandi stovni, veiting og montering av nýggjum av køki, ymiskum eykaarbeiði í verandi stovni. Hetta arbeiðið umfatar:

- Verandi veggur við køk verður niðurtikin og berandi límdrakari verður bygdur ístaðin
- Nýggjur køkur sum víst í prinsippi í hjáløgdu skitsu. Ovnar (1 industri + 1 vanligur), 2 kóki plátur á 80 cm uml, og avtrekk verður á somu síðu uttan til høgru, sum verandi.
- Eymhetta/ur skulu monterast í loft.
- Industri vaskimaskina - flutt út mótvegis útiveggi. Vask verður eftir flutt út mótvegis útveggi.
- Rustfrí borðpláta.
- Niðurtøku av verandi foldiveggi og umgerð av goymslurúmi.
- Nýggj høg skáp úr góðari góðsku v/foldivegg.
- Avmontering og eftirmontering av radiatori v/rørføringum.
- Í køkstilboðnum skal prosjektering av køkim´samskifti skal gerast av professionellum køksveitara - alt neyðugt samskifti til brúkarans krøv og ynski (eftirjusteringar) av hyllum skáp við øllum, sum hartil hoyrir - skal verða íroknað
- Yvirskáp ynskjast ikki men heldur góðar hyllar og høgskáp(serliga í trýkantinum, har sum ovnar eru)
- Eitt køliskáp skal vera undir borðinum nær við oynna
- 4 nýggj frystiskáp
- Køliskáp og ovnar í stovunum í verandi stovni
- Fleiri gardropur í verandi stovni í sambandi við, at stovnurin verður broyttur frá vøggustovu til barnagarðsstovu
- Broytingar av borðum og vøskum o.a.
- Veiting og montering av skilaveggjum millum w.c. kummur. BH ynskir tilboð á avmontering/flyting av vaski(flutt-stillað hægri), veiting og montering av nýggjum kranum í vøskum, burturtakan av einum skiftiborð við vaski og veiting og montering av nýggjari borðplátu.
- Broytingar í skiftirúmum. 2 hæve/sænkeborð til 4 vøggustovur, somuleiðis ynskir mann eyka funktiónir inn í skiftirúmini fyri 4 vøggustovur.
- Skilaveggir / spanskveggir
- Nýggj køliskáp og ovn í tveimum stovum í verandi stovni
- Starvsfólkarúm
- Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

Búsetur hevur veitt samlað tilboð á hesi arbeiði, sum er áljóðandi: 975.776,00, sí skjal 4, j.nr. 25/05986-12

**Samlað fígging**

Samlað fígging til avleiddar verkætlanir, ið eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sí skjal 5, j.nr. 25/05986-13.

**Uttandura arbeiði**

| | |
|---|---|
| Stuðlaveggur | 374.831,75 u/mvg |
| Ymiskt við FIFA vøll | 261.614,24 u/mvg |
| Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður | 86.153,00 u/mvg |
| Skjal 2B_Klæðing av rimaverki | 30.000,00 u/mvg |
| Skjal 2C_Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum | 196.800,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | 949.398,99 u/mvg |

**Innandura arbeiði**
*Skiftirúm – puslirúm*
*Starvsfólkarúm*
*Klárgera rúm til nýggjan køk*
*Nýggjur køkur*
*Hvítvørur til nýggjan køk*
*Barnagarður í verandi stovni*
*Flyta gardropuskáp*
*Nýggj gardropuskáp*
*Flyta vaskirennur*
*Nýggj w.c. kumma*
*Spanskveggir*
Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

| | | |
|---|---|---|
| Til samans uttan mvg. | 975.776,00 | u/mvg |
| | | |
| Samlað fyri innandura og uttandura arbeiði u/mvg | 1.925.174,99 | u/mvg |
| Ókendar útreiðslur | 192.517,50 | u/mvg |
| Til samans uttan mvg | 2.117.692,49 | u/mvg |
| **Til samans við mvg (6,25%)** | **2.250.048,27** | **v/mvg** |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri
- At játtaðar verða 2.251.000 kr. á Løgukonto L31011, Útbygging – Dagstovnurin á Hamrinum. Fíggjað av tøkum peningi frá 2024.
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at fíggingin verður játtað av meirinntøkum fyri 2024.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Kári Johansen skjýtur upp at bjóða arbeiðið út.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Kára Johansen.

Fyri atkvøddu: Sunnuva Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Í móti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála.

5 atkvøddu fyri og 8 atkvøddu ímóti málinum, sum sostatt fall.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Sunnuvá Dahl Høgfeldt.

Í móti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Málið varð sostatt samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 221/25 Umbøn um eykajáttan í sambandi konto 2617

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 02.10.2025 | 58/25 | 25/08905-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 168/25 | 25/08905-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 221/25 | 25/08905-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 25/08905-1 |

**Upprunin til málið**
Talan er um framflytingar av hallið í 2023 og 2024 á konto 2617 - Brúkaragjøld, serstovnar.

**Lýsing av málinum**
Tá børn verða umsorganaryvirtikin sambært lóg um barnavernd, so verða tey sett heiman í fosturfamilju (2613) ella innskrivaði á Barnaverndarstovn undir Almannaverkið. Eitt stovnspláss á Barnaverndarstovni kostar á leið 32.000 kr. pr. mðr. pr. barn. Hendan upphæddin verður bókað av konto 2617.

Tá fíggjarætlanin verður løgd fyri konto 2617, so ger man eina meting útfrá verandi støðu, har hugt verður eftir hvørji børn / ung eru innskrivaði, hvørji væntandi verða útskrivaði, og hvørji møguliga kunnu væntast verða innskrivaði.

Í 2022 lækkar man játtanina við 1,3 mió, tí barnatalið á stovni lækkar. Í 2023 og í 2024 hækkar barnatalið, men játtanin verður ikki reguleráð tilsvarandi. Hetta merkir at eitt hall á 568.000kr í 2023 og eitt hall á 1.158.000kr í 2024 gevur eitt samlað hall á 1.726.000kr, sum verður framflutt í 2025.

Um hugt verður eftir konto 2617 uttan framflyting, so væntast at játtanin fyri konto 2617 heldur við einum yvirskotið á ca. 500.000kr.

Tørvur er á at fáa hallið burtur, tí upphæddin er so mikið høg, at tað er trupult og nærum ómøguligt at spara innaftur, tí fyriskipanin er lógarbundin. Tvs. um mett verður, at eitt barn hevur tørv á stovnsplássið, so skal tilmælið leggjast fyri Føroya Kærustovn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd    Ja ☐    Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Blað nr.: 675 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. oktober 2025 | Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Meir inntøkum 2025 | 2617 | | Brúkaragjøld, serstovnar | | 1.200.000kr |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á Sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini til taka undir við tilmælinum, um eykajáttan á 1.2 mió á konto 2617 “Brúkaragjøld, serstovnar” av meir-inntøkunum fyri 2024, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 02. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

## 222/25 Býarskipan 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 61/25 | 25/04377-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 101/25 | 25/04377-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 131/25 | 25/04377-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 29.09.2025 | 61/25 | 25/04377-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.09.2025 | 61/25 | 25/04377-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 01.10.2025 | 112/25 | 25/04377-1 |
| 7 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 222/25 | 25/04377-1 |

**Upprunin til málið**
Í samgonguskjalinum stendur skrivað, at samgongan:
- vil raðfesta bygging av bústøðum,
- fer undir at dagføra almennu byggisamtyktirnar
- krevur, at fyrilit verða havd fyri nátturu, lívmargfeldi og trivnaði í øllum nýggjum bústaðarverkætlanum og í sambandi við útbyggingar av ymsum slag.

Við hesum orðum verður víst á tørvin á eini dagførdari býarskipan fyri kommununa, sum tekur atlit til bygging av fleiri bústøðum, samstundis sum fyrilit verða havd fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna fekk sína fyrstu býarskipan (Almennu byggisamtyktina) í 1972, sum síðani hevur verið dagførd í staklutum gjøgnum árini. Samfelagsliga gongdin seinastu árini hevur víst, at Býarskipanin ikki hevur verið tíðarhóskandi, hvørki í mun til stóra bústaðartrýstið, tørvin á fleiri íbúðum, ei heldur í mun til at verja okkara náttúru, fríøkir og lívmargfeldi.

Yvirhøvur er sera avmarkað, hvussu nógv kommunur ella Føroyar sum heild hava raðfest býar- ella landsplanlegging ígjøgnum tíðirnar. Einasta planlóg í Føroyum er løgtingslóg um býarskipanir frá 1954.

Infrakervi hevur lutvíst verið raðfest, soleiðis at tað í dag er at kalla gott infrakervi kring alt landið – eisini í Tórshavnar kommunu.

Arbeiðið við at dagføra býarskipanina ella býarplanleggingina hevur tó verið sera avmarkað, og hetta hevur merkt kommununa seinastu árini, tá samfelagið hevur verið í støðugari menning og eftirspurningurin eftir bústøðum hevur verið og framhaldandi er sera stórur.

Nógva byggingin seinastu árini hevur samstundis traðkað á nógv av okkara dýrabaru náttúru, og m.a. tí er løgtingslóg um náttúruvernd frá 2023 gjørd. Endamálið við lógini er, *at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.*

Bústaðarmentanin er somuleiðis í eini broyting. Tað er ikki burðardygt framhaldandi at útstykkja til stór sethús, tí lendið er avmarkað, og tað er tí meiri skynsamt at byggja minni bústaðareindir, so sum raðhús ella íbúðir. Frá at føroyingar einamest hava búð í sethúsum, so hevur verið neyðugt við eini hugburðsbroyting innan bústaðarmentanina, soleiðis at føroyingar eisini vilja búgva í minni bústøðum.

Harumframt er neyðugt í sambandi við endurskoðan av býarskipanini, at hugt verður eftir, hvussu verandi býur og bygging kann endurskapast og tættast, soleiðis at býurin í framtíðini ikki veksur longur út í hagan, men byggir á verandi dygdir, hentleikar og infrakervi, samstundis sum náttúran í býnum verður varðveitt

og tryggjað. Í dag eru fleiri eldri vinnuøkir, sum helst kundu verði umlagað til miðstaðarkend økir við blandaðari vinnu og bústøðum.

Við hesum í huga, og grundað á tørvin at endurskoða kommunalu býarskipanina (Almennu byggisamtyktina), er ætlanin at fara undir eina tilgongd at lýsa, hvørjir møguleikar eru innan fyri verandi býarmark. Tilgongdin hevur til endamáls at skapa meirbygging í verandi býi, samstundis sum náttúran og lívmargfeldið verður tryggjað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin og serstøku byggisamtyktirnar fyri Tórshavnar kommunu.
Løgtingslóg um Býarskipanir frá 1954.
Løgtingslóg um náttúruvernd frá 2023.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna fekk sína fyrstu Kommunuætlan í 2014, sum síðani varð dagførd í 2020. Í Føroyum er eingin lóg, sum krevur kommunuætlanir, og Tórshavnar kommuna er tann einasta kommunan í Føroyum, sum hevur eina kommunuætlan.

Kommunuætlanin leggur upp til, at býurin verður skipaður grundað á tríggjar miðdeplar, har bústaðarøkini skulu byggjast útfrá, samstundis sum gerandishentleikar so sum dagstovnar, skúlar, frítíðarhentleikar, matvøruhandlar osfr. verða raðfestir í miðdeplunum.

Fyri tíggju árum síðani tóktist landið at standa yvir fyri stórum avbjóðingum við, at stór fráflyting var av landinum, og tí var væntaði fólkavøksturin sera ivasamur; antin kundi stígur koma í, ella kundu vit vænta ein lítlan fólkavøkstur. Síðani 2014 hevur fólkavøksturin ligið á umleið 2% árliga, sum hevur havt við sær ógvisligar útbyggingar í samfelagnum sum heild. Undirsjóvartunlar, innkomuvegurin og infrakervið sum heild er vaksið heilt nógv, landsjúkrahúsið er undir útbygging, skúlar eru bygdir, nógvir bústaðir eru bygdir, og grundað á stóra fólkavøksturin er eitt stórt trýst á kommunur um at veita enn fleiri bústaðir.

Í 2018 fekk kommunan sín fyrsta bústaðarpolitikk, sum grundað á bústaðartrotið og avmarkaða byggilendið legði upp til, at fleiri íbúðir skuldu byggjast. Almenna byggisamtyktin varð ikki klár ella dagførd til hesa lutfalsliga stóru broytingina innan bústaðarmentanina, og tískil hevur býarskipanin verið heldur nógv litað av bráðræsispolitikki *(politikkur sum er framdur í skundi og illa umhugsaður).*

Grundað á hesa gongdina seinastu árini, er tað av alstórum týdningi, at farið verður undir at dagføra býarskipanina fyri kommununa, soleiðis at býarskipanin verður burðardygg og harvið tekur atlit til okkara náttúrutilfeingi, samstundis sum meirbyggingin í kommununi verður gjørd út frá planløgdum karmum.

Ætlanin er at fara undir eina miðvísa greining av verandi býi í mun til hesi evni:
1. **Varðveiting/menning av verandi dygdum** (Hvat skal varðveitast? – skráseting av náttúrukílum, haga, fríøkjum, urtagørðum, varðveitingarverdum býarumhvørvum osfr).
2. **Gagnnýta lendið á mest skynsaman hátt** (Hvar og hvussu kann byggjast meir, hvussu ávirkar hetta fólkatalið? – skráseting av tættleikanum í verandi bygda umhvørvið).
3. **Knýta býin og fólkið saman** (Hvussu ávirkar meirbyggingin borgaran, hvussu kann ferðslan skipast betri, kunnu alternativar loysnir takast í brúk?).

Út frá hesi skrásetingini, umframt politiskum kjaki og fakligari sparring er ætlanin at koma fram til eina nýggja og meiri burðardygga býarskipan fyri býin. Ætlanin er at raðfesta arbeiðið beinanvegin, soleiðis at komandi útbyggingar taka útgangsstøði í væl grundaðari planlegging, og soleiðis at málini hjá samgonguni um at hava fyrilit fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði í øllum nýggjum bústaðarverkætlanum og í sambandi við útbyggingar av ymsum slag, verða sett í verk beinanvegin og koma at liggja til grund undir øllum komandi avgerðum innan økið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Fleiri fyrispurningar um bygging av íbúðum, útstykking til vinnuøkir osfr. eru skrásettir í journalini, og koma hesir fyrispurningar somuleiðis at verða tiknir við í tilgongdini.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir at dagføra býarskipanina fyri Tórshavnar kommunu við tí endamáli at tryggja eina meiri burðardygga býarskipan, har fyrilit fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði verða tryggjað, samstundis sum økir verða løgd av til meirbygging og tættari bygging.
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
**Fyri at seta gongd á arbeiðið at endurskoða býarskipanina fyri Tórshavnar kommunu varð skipað fyri eini verkstovu, har ljós varð varpað á trý høvuðsevni: náttúra, bygging og flytføri.**

**Verkstovan hevði til endamáls at lýsa hvørt evni sær við verandi tilfeingi og avbjóðingum, umframt at leggja fram boð upp á, hvussu og hvar kommunan kann flyta seg víðari. Samstundis varð staðfest, at ein nýggj býarskipan má byggja á eitt neyvt greiningararbeiði av verandi býi, sum lýsir, hvussu verandi dygdir bæði kunnu varðveitast og mennast. Skjøtil varð settur á hetta greiningararbeiðið og kann síggjast í framløgunum, sí skjalið *Býarskipan verkstova – Framløgurnar (samlað).***

Arbeiðið hevur sostatt til endamáls at leggja eina greiða og burðardygga kós fyri framtíðar býarskipan, har fyrilit fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði eru ein sjálvsagdur partur av avgerðargrundarlagnum, og har tørvurin á fleiri bústøðum verður loystur á ein skipaðan og skilagóðan hátt.

Í framhaldi av verkstovuni verður mælt til at fara víðari við trimum átøkum, sum skulu mynda næsta stig í tilgongdini at dagføra býarskipanina:

1. **Verkstova við mennarar**
   Ein skipað verkstova, har byggiharrar, ráðgevar og aðrir áhugapartar verða boðsendir. Endamálið er at leggja fram sjónarmið hjá kommununi um nýggjar menningarverkætlanir og greiða frá, hvørji viðurskifti mennarar og ráðgevar eiga at taka atlit til. Samstundis fáa mennarar høvi at leggja fram sínar royndir og hugskot. Hetta skal skapa greiðar karmar fyri framtíðar bygging og menning og samstundis styrkja samstarvið millum kommunu og mennarar.

2. **Náttúruverndarlógin:**
   Nýggj lóg um náttúruvernd kom í gildi í mai 2023, og gevur nýggj amboð at verja náttúruna og lívmargfeldið. Í lógini stendur í § 1, at endamálið við lógini er at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

   Í § 4 “Almenn fyrilitsskylda” er ásett, at *øll hava skyldu til at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, til, at náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða. Verður virkað sambært loyvi frá almennum myndugleika, er fyrilitsskyldan at rokna sum lokin, um fyritreytirnar fyri loyvinum framvegis eru til staðar.*

   Í § 5 um “Onnur týðandi samfelagsáhugamál” er ásett, *at tiltøk eftir náttúruverndarlógini skulu vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum.*

   Spurningurin er, hvat hesar ásetingar merkja fyri kommununa. Í samstarvi við Umhvørvismálaráðið skal staðfestast/umrøðast, hvussu lógin kann nýtast sum grundarlag í arbeiðinum við býarskipanini, og hvussu hon kann handhevjast í spurninginum um náttúrulendi, ið antin skulu varðveitast, ella møguliga krøv setast til mennarar í sambandi við bygging. Soleiðis verður tryggjað, at nýggj býarskipan er í samljóði við galdandi lóggávu og nýggj krøv til náttúruvernd.

3. **Lendisætlan**:
   Skjøtil verður settur á arbeiðið at gera eina samlaða lendisætlan fyri umhvørvið og býarnáttúruna. Umhvørvisdeildin varðar av uppgávuni í samstarvi við býarskipanardeildina. Lendisætlanin skal geva greiða mynd av, hvar nýggj bygging kann fara fram, og hvørji øki skulu varðveitast ella friðast. Hon skal tryggja, at lendið verður gagnnýtt á burðardyggan hátt, og at náttúra og lívmargfeldi fáa neyðuga verju. Samstundis verður ætlanin eitt týðandi amboð hjá kommununi í framtíðar býarmenningini.

Afturat hesum kunnu ítøkilig átøk setast í verk, sum bæði geva skjótan ágóða og leggja kós fyri framtíðar menning. Og verður mælt til at býta átøkini í tveir bólkar:

- **Bólkur 1) Skjót átøk –** lættari átøk, sum kunnu fremjast her og nú.
  - *Í kortinum í almennu byggisamtyktini (býarskipan) útleggja nýggj D1 øki sum meginregla min. $3000m^2$* – Í økjum, ið eru minni enn $3000m^2$, eiga grønu økini at verða tryggjað við serstakari byggisamtykt ella útstykkingarætlan/skeytum. Útstykkingarætlanir eiga at verða koyrdar í kortskipanina, soleiðis at tær eru sjónligar fyri øllum.
    **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

  - *Taka áseting um bygging í D1 økjum úr § 18. Ásetingar fyri umráðispart D1 í 3. grundumráði –* Broyta orðingina, so tað er sjónligari, at ikki skal byggjast í økinum. Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál.
    **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

- *Áseting um stødd á fríøki í almennu byggisamtyktini skal fylgja íbúgvaratalinum heldur enn víddini av lendinum* – Tað eru ymiskir mátar at gera hetta, støddin kann fylgja bygdum fermetrum, nøgdini av bústøðum ella øðrum. Eisini skal dentur leggjast á, at økini skulu hava ein grønan dám og verða við til at betra um lívmargfeldi í nærumhvørvinum.
  **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

- *Broyta grundstykkjavíddir* – seta minstu grundstykkjavídd í sethúsaøkjum niður til 400 $m^2$ – og eina mest loyvda grundstykkjavídd. Harumframt seta grundstykkjavídd í 1. og 2. grundumráði niður í stødd.
  **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

- *Áseting um bygningar í býaratlasi í almennu byggisamtyktina* – Bygningar, ið eru skrásettir við varðveitingarvirði 1-4, skulu ikki kunna takast niður. Um broytingar verða gjørdar í framsíðu, vindeygum, tilfari, tekju ella øðrum lutum, ið eru sjónligir, skulu hesar fáa serloyvi frá byggivaldinum til hetta.
  **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

- *Deilibilar – at vísa á úrvald p-pláss til felags bilskipan og at bjóða privatu vinnuni at átaka sær skipan til deilibilar í kommununi.* Hetta kann t.d. minka um bilatalið í býnum, lætta um ferðsluna og geva meira rúm til onnur endamál.
  **Ábyrgd:** Tekniska deild

- *Nýggir vegaprofilar* – at broyta vegir soleiðis, at meira pláss verður til gongufólk og súkklur. Hetta ger ferðsluna bæði tryggari, grønari og burðardyggari.
- **Ábyrgd:** Tekniska deild

- *Gera vegleiðing til, hvussu ásetingin í almennu byggisamtyktini kap. III, § 3, stk. 1 skal handhevjast.* – "Í 1. og 2. grundumráði skal bera til at seta aðrar treytir til parkering, um so er, at ikki ber til at útvega øll tey ásettu parkeringsplássini."
  Dømi: Í 1. og 2. grundumráði, umframt í økjum, har tað í mesta lagi eru 200 m til bussteðgipláss (við einum ávísum títtleika), ber til at minka um kravið til bilparkering við 50 %.
  **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin, tekniska deild og byggimálsdeildin

- *Smærri broytingar í býarrúminum* – at skapa fleiri grøn øki, gera betri gonguleiðir og styrkja sambondini millum býlingar. Hetta stuðlar undir trivnaðin og ger býin meira atkomuligan.
- **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

- **Bólkur 2) Størri átøk –** átøk, sum krevja meiri greining, fyrireiking og fakligt grundarlag.
  - *Meirbygging í verandi grannaløgum (má kannast/greinast nærri)* – Um møguligt er/og hvussu, man kann byggja meir/afturat á grundstykkjum, ið eru størri enn eitt vist.
    **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

  - *Broyting í Almennu byggisamtyktini* – Víðka um miðbýin (1. og 2. grundumráði)
    **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

  - *Serstakar byggisamtyktir* – Í ávísum økjum er tørvur á serligum reglugerðum, sum tryggja, at nýggj bygging fer fram í samljóði við søgulig virðir, náttúru ella verandi býarrúm o.a.

**Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

- *Flytførisætlan* – ein heildarætlan fyri ferðsluna í kommununi, ið tekur samanum ymisk sløg av ferðslu og leggur dent á tryggar og burðardyggar loysnir.
  **Ábyrgd:** Tekniska deild

- *Dagføring av býaratlasinum* – at savna saman vitan um varðveitingarverd býarumhvørvi og hús í kommununi, sum skal geva eitt neyðugt faktagrundarlag undir framtíðar avgerðum.
  **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

- *Býarnýggjan – Størri samanhangandi økir við potentiali at vaksa og gerast tættari til mið- og bústaðarøki.*
  Verkstovan vísti á økir, sum t.d. vinnuøkini á Hálsi og í Vika, sum kunnu býarnýggjast til at fevna um meirbygging/bústaðir.
  **Ábyrgd:** Býarskipanardeildin

Harumframt er arbeiðið við arkitekturpolitikkinum longu farið í gongd, sí mál nr. 25/03681, Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu, og verður hann ein týðandi hornasteinur í nýggjari býarskipan.

**Skjøl**
Býarskipan verkstova_Framløgur (samlað), journal nr. 25/04377-4.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at umsitingini verður heimilað at arbeiða við omanfyri standandi átøkum, og at átøkini verða løgd hvør sær til politiska viðgerð, tá tey eru fyrireikað, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 29. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við málinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 01. oktober 2025:** Framlagt. Ynski er, at mentanarstovnar og trivnaður fær størri rúmd í samlaða projektinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Málið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 ímóti og 2 blonkum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála og Sunnvá Dahl Høgfeldt, tekur undir við tilmælinum.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

# 223/25 Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 5.1 - 23/06318

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 74/25 | 25/04323-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 97/25 | 25/04323-2 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 153/25 | 25/04323-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.10.2025 | 144/25 | 25/04323-2 |
| 5 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 223/25 | 25/04323-2 |

**Upprunin til málið**
Talan er um framhald av máli nr. 23/06318 – sí viðheftu málslýsing, sum lýsir gongdina í málinum, j. nr. 23/06318-2, Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1.

19. september 2024 samtykti býráðið:
- at selja og sundurbýta økið 5.1 til tilboðsgevara, Sp/f SH Ráðgeving við Hanusi Olsen
- at Tórshavnar kommuna stendur fyri at savna ein keyparaskara og lutar raðhúsaeindirnar út millum hesi og harvið tryggjar tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Lýsing av málinum**
SH Ráðgeving hevur síðani arbeitt víðari við málinum, og hevur keypari víst á, at tað kanska hevði verið ein góður eyka møguleiki hjá komandi keyparum av raðhúsunum at hava møguleikan at keypa raðhúsaeindirnar óinnrættaðar, og so statt einans sum innilokað raðhús.

27. november 2024 sendi SH Ráðgeving kommununi (Byggimálsdeildini) umsókn um byggiloyvi. Í tilfarinum var somuleiðis ein umsókn um at kunna selja raðhúsini innilokað, sí j. nr. 25/04323-1, Umsókn um innilokaði hús.

Raðhúsini eru í trimum hæddum og verða uml. 210 fermetrar samanlagt. Sølukostnaðurin er fastur prísur fyri lyklaklár hús, áljóðandi kr. 4.450.000.

Í umsóknini verður upplýst, at raðhúsini, einans innilokaði, kunnu seljast fyri kr. 3.490.000. Innilokað hús hava undirsløg lagt í í lofts- og miðhædd við krossfinerplátum álagdar. Kjallaragólv er bjálvað, og klapplag er stoypt. Brunaverja í takkonstruktión millum húsini er gjørd. Íbindingargjald til fjarhita er íroknað søluprísin.

Í løtuni verður arbeitt við at gera endaliga sølutilfarið klárt, soleiðis at kommunan kann fara undir at savna ein keyparaskara og luta raðhúsaeindirnar út millum hesi og harvið tryggja tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Byggisamtyktin er gjørd fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at tað í hesum tíðum, møguliga er gott hjá endaliga fyrstu ferð keyparunum at kunna standa sjálvi fyri endaligu innrættingini. Fíggjarliga eru fólk í hesum tíðum rættiliga sperd, og at fáa møguleikan at keypa eini raðhús á uml. 210 ferðmetrar fyri kr. 3.490.000 verður mett vert at kunna bjóða endaliga keyparanum.

Við at ganga umsóknini á møti merkir einans, at endaligi keyparin fær møguleikan at velja at keypa innilokaði ella liðug bygd hús. So statt verður ikki mett, at hetta er ein bági fyri endaliga keyparan, men heldur ein góður møguleiki at kunna bjóða keyparanum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Uppruna málið – *25/04323, Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1 og øki 5.2*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Stjórnarskrivstovan vísir á, at skeytið leggur upp til, at eindirnar verða seldar sum liðugt innrættaðar eindir og við bústaðarskyldu (§ 9 í skeytinum). So statt verður neyðugt at taka hædd fyri hesum, um hetta verður broytt, og um onkur velur at keypa eindirnar einans innilokaðar.

Stjórnarskrivstovan tekur annars undir við at loyva umsóknini, grundað á viðmerkingarnar um, at tað møguliga gerst lættari hjá summum keyparum at ogna sær ein bústað.

**Skjøl**
j. nr. 25/04323-1, Umsókn um innilokaði hús

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at ganga umsóknini á møti, og at raðhúsini verða boðin út, soleiðis at keypari fær valmøguleikan at keypa raðhúsini sum liðugt bygd raðhús ella innilokaði raðhús.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Nevndir tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sp/f S.H. Ráðgeving hevur kunnað umsitingina um, at av tí at verkætlanin er so nógv seinkað, grundað á longu viðgerðartíðina hjá Tórshavnar kommunu, so standa undirveitararnir ikki við síni tilboð longur, og so statt hækkar kostnaðurin fyri hvørja raðhúsaeind.

Upprunaligi kostnaðurin fyri hvørja raðhúsaeind, sum verkætlanin varð samtykt við, var áljóðandi kr. 4.450.000. Nýggi hækkaði kostnaðurin er áljóðandi kr. 4.500.000, t.m. at hvør raðhúsaeind á hvør sínar 210 fermetrar er hækkað við kr. 50.000.

Henda støðan er sjálvandi sera harmilig, men skyldast hon, at stykkini í útstykkingini vórðu boðin út ov tíðliga, við nógvum óvissum, og var verkætlanin ikki nóg búgvin, t.d. var matrikulleringin ikki avgreidd og byggimálsdeildin kundi tískil ikki endaliga viðgera umsóknina. Tilboðið varð upprunaliga latið kommununi 19.07.2024. So statt er skjótt eitt ár gingið, og vita vit, at tíðin kemur í spæl í sambandi við tílíkar verkætlanir. Verkætlanin hevur enn ikki fingið endaligt byggiloyvi.

Raðhúsini á 210 fermetrar verða seld sum lyklaklárar bústaðareindir. Fermetrakostnaðurin fyri bygdu fermetrarnar verður so statt kr. 21.428.

Bústaðir byggir sínar bústaðir fyri áleið 25.000 kr/fermeturin.

Sp/f S.H. Ráðgeving hevur upplýst, at meklarin Betri Heim hevur mett, at sluprísurin á raðhúsaeindunum liggur á uml. 27.000 kr/fermeturin. Sostatt hevði eitt annað raðhús á 210 fermertrar verið selt í fríðari sølu fyri áleið kr. 5.670.000.

Kommunan kann so statt veita borgarum í kommununi við hesi verkætlanini nøkur raðhús, sum eru áleið 5.500 kr bíligari pr. fermetur og heilar 1.170.000 kr bíligari í mun til aðrar sølur av bústøðum í kommununi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja, at endakostnaðurin fyri raðhúsaeindirnar á 210 fermetrar verður hækkaður frá kr. 4.450.000 til kr. 4.500.000, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sp/f S.H. Ráðgeving hevur enn eina ferð kunnað umsitingina um, at av tí at verkætlanin er so nógv seinkað, grundað á longu viðgerðartíðina hjá Tórshavnar kommunu, so standa enn fleiri undirveitarar ikki við síni tilboð longur, og so statt hækkar kostnaðurin enn eina ferð fyri hvørja raðhúsaeind.

Upprunaligi kostnaðurin fyri hvørja raðhúsaeind, sum verkætlanin varð samtykt við, var áljóðandi kr. 4.450.000. Síðani hækkaði kostnaðurin fyrr í vár við kr. 50.000, og nú hevur sp/f S.H. Ráðgeving víst á at nýggi hækkaði kostnaðurin er áljóðandi kr. 4.850.000, t.m. at hvør raðhúsaeind á hvør sínar 210 fermetrar kemur at kosta áleið 23.095 kr/fermetur.

Henda støðan er sjálvandi sera harmilig, men skyldast hon, at stykkini í útstykkingini vórðu boðin út so mikið tíðliga, at tað vóru nakrar óvissur, og var verkætlanin ikki heilt búgvin, t.d. var matrikuleringin ikki avgreidd, og byggimálsdeildin kundi tískil ikki endaliga viðgera umsóknina. Tilboðið varð upprunaliga latið kommununi 19.07.2024. So statt er meiri enn eitt ár gingið, og vita vit, at komandi oktober hækka nærum allar tímalønir. Somuleiðis upplýsir S.H. Ráðgeving, at prísurin á timbri og betong er hækkaður síðani seinastu kostnaðarmeting, og fyrst í komandi ári hækka prísirnir á køkum, hvítvørum og bæðirúmsmøblum eisini.

Verkætlanin hevur enn ikki fingið endaligt byggiloyvi, og treytar S.H. Ráðgeving sær, at kostnaðurin kemur at halda, um so er at farast kann undir verkætlanina í 2025. T.m. at hann skal hava byggiloyvi í hesum árinum/skjótast gjørligt, fyri at verkætlanin kann fara í gongd í 2025.

Raðhúsini á 210 fermetrar verða seld sum lyklaklárar bústaðareindir fyri kr. 4.850.000. Fermetrakostnaðurin fyri bygdu fermetrarnar verður so statt kr. 23.095.

Bústaðir byggir sínar bústaðir fyri áleið 25.000 kr/fermeturin.

Sp/f S.H. Ráðgeving hevur upplýst, at meklarin Betri Heim hevur mett, at søluprísurin á raðhúsaeindunum liggur á uml. 27.000 kr/fermeturin. So statt hevði eitt annað raðhús á 210 fermertrar verið selt í fríari sølu fyri áleið kr. 5.670.000.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Umsitingin ásannar, at tað er óheppið, at kostnaðurin enn eina ferð hækkar á raðhúsaeindunum.
Og tað kann møguliga sýnast sum viðgerðartíðin hevur verið long, men tilboðið at keypa stykkið og innrætta tað til raðhús varð móttikið á sumrið 2024. Umsókn um byggiloyvi var send kommununi síðst í 2024.
Men fyri at kunna viðgera byggiloyvi, so hevur verið neyðugt at fáa stykkið matrikkulerað, tinglýst osfr.

Kostnaðurin fyri raðhúsaeindina er væl lægri enn aðrar raðhúsaeindir undir Kongavarða verða seldar fyri í 2025, og tískil verður mælt til at góðtaka/samtykkja hækkaða kostnaðin til kr. 4.850.000 pr. raðhúsaeind.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja, at endakostnaðurin fyri raðhúsaeindirnar á 210 fermetrar verður hækkaður úr kr. 4.500.000 upp í kr. 4.850.000, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Málið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála og Sunnvá Dahl Høgfeldt, tekur undir við tilmælinum.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

## 224/25 Menning av Vágsbotni - 22/01036

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 132/25 | 25/08620-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 169/25 | 25/08620-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 224/25 | 25/08620-1 |

**Upprunin til málið**
Henda málslýsingin vísir til málið við sama heiti *Menning av Vágsbotni*, sí mál nr *25/08620-2, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_01036, Menning av Vágsbotni – Ætlan fyri Summarið 2022.*

**Lýsing av málinum**
Í 2018 varð skipað fyri eini arkitektakapping um torgið í Vágsbotni, mál nr. 18/00808, *Vágsbotnur - skipan av økinum*.

Tann ætlanin varð slept grundað á væntandi politiska undirtøku og ymisk ivamál í vinnandi loysnini, sum Zeta arkitektar áttu.

Samgongan heitti síðani á umsitingina um at sjóseta verkætlanina Menning av *Vágsbotni* í 2022. (jnr. 22/01036).

Verkætlanin Menning av Vágsbotni snúði seg í stuttum at umskipa torgið í Vágsbotn í eini royndarverkætlan, har einans smærri inntriv vórðu gjørd í lendið.

Ein timburpallur við eini almennari lívdarpavillion varð bygdur í sólargóðu síðuni á Vágsbotni oman á gamla vegnum. Hetta nýggja uppihaldsplássið knýtir soleiðis økið við sititrappuni beinleiðis saman við bryggjuni. Vegurin varð fluttur vesturum í eina meira ferðtálmandi koyrilegu við tilfari, sum varð lagt oman á verandi, og standmyndin av Nólsoyarpálli varð eisini flutt.

Henda verkætlanin varð ætlað og samtykt sum ein "royndarverkætlan", sum skuldi geva kommununi nakrar ítøkiligar royndir um, hvussu økið eigur at vera skipað í eini varðandi loysn í framtíðini. Ein meininga- og hagtalskanning varð eisini gjørd, sum ein partur av hesi royndarverkætlanini.

Lívdar-pavillionhúsini vórðu niðurtikin í juni 2024, í sambandi við at Voxbotn festivalur og Tórsfest skuldu vera á staðnum, og fyriskiparanir vildu hava økið ruddað til tiltakið.

Tey vórðu ikki sett upp aftur, men liggja á goymslu í eini bingju á Oyrareingjum.

Meira verður ikki gjørt við hesa verkætlanina, fyrr enn tað verður raðfest aftur, og málið er tískil lokað.

Eftir á kontuni á hesi játtanini standa kr. 69.000, og mælt verður til at flyta eftirstandandi peningin á løgukarmin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Vágsbotnur - skipan av økinum,* J.nr. 18/00808

*Menning av Vágsbotni*, j. Nr. 22/01036

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**
-
**Skjøl**
*25/08620-2, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_01036, Menning av Vágsbotni – Ætlan fyri Summarið 2022*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62045 | Vásbotnur – skipan av økinum | 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | | 69.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina og flyta yvirskotið áljóðandi kr. 69.000 av konto L62034, *Vágsbotnur - skipan av økinum*, á løgukarmin LK62999, *Fríðkan av býnum,* og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

# 225/25 Skipan av býlingum við Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 137/25 | 25/08816-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 225/25 | 25/08816-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið snýr seg um at lýsa og fáa samlað saman um skipanina av býlingi 1 og 4 við Stórutjørn.

Býlingur 1 varð settur í gongd av málinum *Útstykking til sethús við Stórutjørn* – j. Nr. 25/00581 og 22/02943. Sí skjal nr. *25/08816-2, Upprunalig málslýsing mál nr. 25_00581 Útstykking til sethús við Stórutjørn 22_02943.*

Í tilgongdini varð farið undir at skipa býling 4 eisini, tá grót frá Húsareynstunlinum skuldi fáast til vega. Tískil er nú týdningarmikið at fáa endaligu skipanina av býlingi 1 og 4 til politiska viðgerð, soleiðis at semja er um, hvat skipan arbeitt verður eftir.

**Lýsing av málinum**
Gongdin í hesum málinum hevur verið hendan:

<u>Heildarætlanin fyri Stórutjørn, mál nr. 18/03468</u>
Heildarætlanin fyri Stórutjørn varð samtykt í býráðnum í september 2023, sum eitt vegleiðandi amboð fyri víðari menningina av økinum. Tað vóru SNA og MAP arkitektar, sum saman teknaðu ætlanina.

Høvuðstættirnir í heildarætlanini hava í allari tilgongdini verið stýrandi fyri, hvussu økið verður skipað.

Hesir tættirnir eru:

a) Náttúra og veðurlag stýra sniðgevingini í tann mun, at býlingarnir verða skipaðir í mun til best skikkaða byggilendið í økinum, sum eru heyggjarnir og heiðalendið eystan fyri sjálva Stórutjørn.
Vátøkini sunnan og norðan fyri tjørnina Stórutjørn verða lutfalsliga órørd, og verða nýtt sum almenn grøn fríøki og eisini sum bindilið millum Stórutjørn og býin.
b) Býlingarnir verða skipaðir við eini lívdargevandi rond av raðhúsum, sum serliga verjir fyri útsynninginum.
c) Býlingarnir við Stórutjørn verða skipaðir kring ein miðstaðarkjarna, sum høvuðsvegurin frá Hoyvík eisini verður knýttur upp í.
Býlingarnir verða hvør sær skipaðir við eini fjølbroyttari og fleksiblari samanseting í huga. Hvør býlingur skal skiljast sum ein sosialt burðardygg og sjálvirkandi eind, við ymiskum bústaðarstøddum, bústaðarsløgum og ognarleistum, sum skal tryggja, at býarparturin tilsamans fær eina fjølbroytta samanseting av íbúgvum, tvørtur um aldurstig og inntøkustøði.

Sí samtyktu heildarætlanina: *Stóratjørn heildarætlan 1sept2023 opnur*, mál nr. 18/03468-89

<u>Neyðugar tillagingar av heildarætlanini</u>
Tað gjørdist tó greitt, at ymsar broytingar máttu gerast í heildarætlanaruppskotinum, um skipanin skuldi berast á mál við fyriliti fyri at varðveita sum mest av náttúruni, at gagnnýtslan av tikna lendinum skuldi vera so skynsom sum gjørligt, fyri ein so lágan fyrireikingarkostnað sum gjørligt.

Atfinningarnar vóru m.a.

- Ov nógvir vegir skuldu gerast í verkætlanini til lutfalsliga fáar bústaðir. Tað hevði viðført ein ov høgan sølukostnað av endaligu bústaðareindunum.
- Ov fáir bústaðir fingust burtur úr økinum sum heild, um hugsað verður um, at so stórt náttúrulendi verður tikið til at útstykkja og menna.
- Ov nógv av upprunaligu náttúruni mátti lúta fyri manngjørdum lendisarbeiði. Eitt nú eru nógvar smáar tjarnir í økinum, sum hvør í sínum lagi hava eitt náttúrligt til- og frárensl ígjøgnum økið. Teimum var ikki lív lagað í ætlanini í sinum upprunaskapi.
- Tveir av býlingunum høvdu eina ivasama skipan í mun til trivnað og fjarstøðu (Býlingur 5 og 6), við einum alt ov longum og dýrum atkomuvegi ígjøgnum náttúruna.

Talan var tískil um rættiliga umfatandi broytingar, sum skuldu gerast, men ráðgevarnir vóru ikki sinnaðir at gera tillagingar á heildarætlanina uttan meirkostnað. Semja varð sostatt um, at skipanin av økinum skuldi tillagast á býarskipanardeildini í Tórshavnar kommunu, har arbeiðast skuldi við at nágreina skipanina av býlingunum 1,2,3 og 4 í heildarætlanini. Byrjað var við at nágreina býling 1, og síðani býling 4.

Articon og sethúsaútstykking
Fyri at seta hol á verkætlanina varð arbeiðið við avgrevstri at fyrireika býling 1 bjóðað út sum høvuðsarbeiðstøka millum 5 arbeiðstakarar. P/F Articon vann útboðsumfarið við lægsta kostnaðinum á slakar kr. 6 mió. samlað.

Articon handaði síðani kommununi eitt sjálvboðið tilboð um eina heildararbeiðstøku at gera bæði býling 1 og býling 4 byggibúnar á góðar kr. 74 mió u.mvg.

Í hesum tilboðnum hevði Articon teknað eitt uppskot um eina nýggja skipan til Býling 4 við raðhúsa- og sethúsagrundstykkjum, sum ikki var í samsvari við heildarætlanina.

Uppskotið hjá Articon fevndi um at gera tilsamans 150 grundstykkir í Býlingi 1 og 4, harav 67 stk vóru til randarhús og 83 stk vóru til sethús. Um roknað verður við, at raðhúsagrundstykkini kunnu hava tvær íbúðir hvør, so svarar hetta til eitt samlað bústaðartal á 218.

Sí uppskotið hjá Articon á síðu 4 í skjalinum: *Stóratjørn - Býlingsskipan Býlingur 1 og 4 - 22sept2025*, mál nr. 25/08816-3

Í upprunaligu heildarætlanini var ætlanin, at 204 bústaðir skuldu rúmast í býlingi 1 og 4 tilsamans.

Býarskipanardeildin viðmerkti tá, at skipanaruppskotið frá Articon hevði flutt seg ov langt frá høvuðstættunum í heildarætlanini, at hetta ikki var ein heppin býlingsskipan, og at nú var talan harumframt um eina munandi minking í talinum á ætlaðum bústaðareindum. Býarskipanardeildin legði dent á, at tað var óheppið at so nógv lendi skuldi fara til at útstykkja vanlig sethúsagrundstykkir á 300-450m² í hesi verkætlanini, við atliti til hugsjónina um skynsama lendisnýtslu.

Við støði í hesum heildararbeiðstøkutilboðnum, samtykti býráðið í juni 2024 at gera eitt sokallað “rammutilboð” við Articon uppá samlaðu arbeiðstøkuna við byggibúningini av býlingi 1 og 4. Rammutilboðið skuldi skiljast soleiðis, at fíggjarligi karmurin á tilboðnum varð fastlæstur, men har sjálv skipanin av økinum og talið á bústaðareindum skuldu endurskoðast í eini samráðingartilgongd millum Articon, Býarskipanardeildina og LBF, sum prosjekterandi ráðgeva.

Skoytast skal uppí, at orsøkin til at hetta arbeiðið við byggibúning av bæði býlingi 1 og 4 ikki varð boðið út av nýggjum, m.a. var, at Articon longu var arbeiðstakari á staðnum á verkætlanini við innkomuvegin, og:
- gróttilfeingið frá innkomuvegnum sostatt verður endurnýtt í einari arbeiðsgongd, umhvørvinum at gagni.
- Kostnaðurin er á slíkum støði, at keypskostnaðurin fyri byggiklár grundstykki er sjáldsama lágur i mun til aðrar útstykkingar í kommununi (grundað á stuttflutta gróttilfeingið úr tunnilinum við nýggja innkomuvegin).
- Farast kann undir útstykkingina beinanvegin, uttan at arbeiðsplássið í sambandi við innkomuvegin skuldi avriggast fyrst.

**Uppskot um endaligu skipanina av Býlingi 1 og 4**
Í samráðingartilgongdini millum teknisku fyrisiting, Articon og LBF fyriliggur nú eitt dagført skipanaruppskot av býlingi 1 og 4, sum umsitingin mælir til at samtykkja.

Sí síðu 2 og 3 í skjalinum: Stóratjørn - *Býlingsskipan Býlingur 1 og 4 - 22sept2025,* mál nr. 25/08816-3

Uppskotið leggur upp til eina býlingsskipan fyri býling 1 og 4, sum kann bera 410-420 búeindir tilsamans. Hetta kann røkkast við eini ætlaðari bústaðarblanding av:

- **162 íbúðir í Randarhúsum (39,4%)**
  66 íbúðir í raðhúsum í tveimum hæddum (+ nýttum lofti) Tvær íbúðir í hvørjari húsaeind
  96 íbúðir í raðhúsum í 3 hæddum (+ nýttum lofti) – tríggjar íbúðir í hvørjari húsaeind
- **46 vanlig randarhús (11,2%)**
  24 Vanligum randarhúsum í trimum hæddum, sum vit kenna frá grannalagnum "Inni á Gøtu".
  22 Raðhúsum í tveimum hæddum, sum vit kenna frá t.d. Maritugøtu í Hoyvík
- **60 blandaðar modul-eindar-íbúðir til m.a. eldri og støk. (14,5%)**
  Hetta eru íbúðir í blandaðum støddum, umframt til vanligar familjur 45 m² - 95 m² (støddir, sum vit t.d.kenna frá íbúðarbyggingini Oman Mattalág)
- **≈ 77 búeindir í samanbygdum krosshúsum (18,7%)**
  Hetta verður skipað sum 11 byggifelagskaps-eindir við 4-8 búeindum í hvørjum

  Sí skjalið: *Krosshús uppbygnaður 22sept2025*, mál nr. 25/08816-4
- **16 sethús við 300 m² grundstykki (3,8%)**
- **Á leið 50 lestraríbúðir í tveimum íbúðarbygningum, við útvendum virksemi í niðastu hædd, sum eru partur av ætlaða miðstaðarkjarnanum. (12,1%)**
- Hugsanin er eisini, at pláss verður sett av til dagstovn og felagshús, t.d. sum partur av miðstaðarkjarnanum.

Eisini er dentur lagdur á, at órørd náttúruøkir verða varðveitt í býlingi 1 og 4 sum miðsavnandi felagsøkir. Hetta eru økir við tjarnum og kringliggjandi vátlendi.

Eisini eru grønir geirar millum býlingarnar, sum knýta grannaløgini saman og leiða út til størru náttúruøkini, sjálva Stórutjørn og vátlendini vestan fyri útstykkingina.

Hetta skipanaruppskotið er eitt ávegis arbeiðsskjal, har arbeitt verður leypandi við smávegis tillagingum, og ymsar broytingar eru tískil væntandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Skipan av Stórutjørn, j. Nr. 18/03468
Útstykking til sethús í Stórutjørn, j. Nr. 22/02943
Útstykking til sethús í Stórutjørn, j. Nr. 25/00581

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
25/08816-2, Upprunalig málslýsing mál nr. 25_00581 Útstykking til sethús við Stórutjørn 22_02943
Stóratjørn heildarætlan 1sept2023 opnur, mál nr. 18/03468-89

Stóratjørn - Býlingsskipan Býlingur 1 og 4 - 22sept2025, mál nr. 25/08816-3
Krosshús uppbygnaður 22sept2025, mál nr. 25/08816-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið av býlingi 1 og 4, sum lýst omanfyri,
- at heimila umsitingini at halda fram við arbeiðsætlanini eftir verandi leisti
- og at málið verður lagt fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tróndur Sigurðsson biður um at koyra málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Tróndi Sigurðssyni.

5 atkvøddu fyri og 7 atkvøddu ímóti og 1 atkvøddi blankt í málinum, sum sostatt fall.

Fyri atkvøddi: Sunnuva Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen, tekur undir við broytingaruppskotinum.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála, tekur ikki undir við broytingar-uppskotinum.

Blankt atkvøddi Heðin Mortensen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen  og Sunnuvá Dahl Høgfeldt.

Málið varð sostatt samtykt við átta atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

# 226/25 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 76/25 | 25/02294-3 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 129/25 | 25/02294-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 136/25 | 25/02294-3 |
| 4 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 226/25 | 25/02294-3 |

**Upprunin til málið**
Endamálið við uppskotinum er at skapa umstøður til at økja um útboðið av fjølbroyttum íbúðum í Tórshavnar kommunu. Kommunuætlanini frá 2018 staðfestir, at tørvur er á at økja um lutfallið av íbúðum í mun til sethús.
Mál varð stovnað á heysti 2021, við tí endamáli at bjóða út at byggja lutaíbúðir og varð, umframt á Frúutrøð, víst á økið ovast á Villingadalsvegnum, matr. nr. 1356 og 1355 (sí mál nr 21/04713).

Býarskipanarliga er tað júst økið við Villingardalsvegin, sum hóskar seg sum næsta stóra menningarøkið, har byggjast kunnu bústaðir, umframt bygging til gerandishentleikar, so sum umstøður til handil, lækna, tannlækna o.a. Økið er í nærum beinleiðis sambandi við nýggja innkomuvegin, og tískil verður eisini mett ráðiligt at fara undir bygging í hesum økinum nú innkomuvegurin er um at vera liðugur.

Økið liggur niðan fyri hamaran, sum gongur sum ein rond framvið Villingardali, Undir Fjalli og Miðhorn. Býarskipanarliga verður mett hóskandi at partvíst nýta økið til lutfalsliga høga bygging (4-5 hæddir), tí útsýnið eystur og suðureftir verður ikki tikið frá verandi húsum. Harafturat skapar hamarin lívd frá vesturættini.

**Lýsing av málinum**
Í mál nr. 22/07300, *Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn,* varð byggisamtyktin broytt frá A3 til A2 (høga bústaðarbygging), og varð hetta samtykt á býráðsfundi í mars 2023 og eftirfylgjandi góðkent av Umhvørvismálaráðnum.
Útstykking í A2, t.e. skipan av økinum, krevur serstaka byggisamtykt.

Umsitingin hevur verið í eini tilgongd at skipa økið saman við avvarðandi pørtum. Sambært galdandi almennu byggisamtyktini og innsendu uppskotunum, kann økið skipast við høgari bygging (í mesta lagið 5 hæddir) upp at hamrinum, og lægri raðhúsabygging (tvær hæddir) í og kring matr.nr. 1354a, sum er næstur atliggjandi sethúsunum. Týdningarmikið hevur verið, at økið verður skipað við fríøkjum og skynsomum vegasambandi, soleiðis at tað í stigum kann byggjast afturat, samstundis sum heildarætlan verður varðveitt.

Sí innsendu uppskotini:
- *25/02294-7 – Uppskot fyri matr. nr. 1354a og 1354b*
- 25/02294-6 – Uppskot fyri matr. nr. 1355 og 1356

Sambært innsendum uppskotum kunnu tað byggjast upp ímóti 500 íbúðareindir í økinum í umleið 30 bygningum. Til tess at seta hol á hesa verkætlan, og at tryggja at økið verður skipað sum ein heild, er neyðugt at gera serstaka byggisamtykt fyri økið. Økið er umleið 46.000 m$^2$ til støddar, og er hugsanin at serstaka byggisamtyktin kemur við árunum at fevna um alt økið eisini økið vestanfyri/niðanfyri Villingadalsvegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A2 og A3.

*Ásetingarnar fyri A2 eru:*

1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.
2. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.
4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.
5. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
6. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

*Ásetingarnar fyri A3 eru:*

1. Umráðisparturin verður lagdur til blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
2. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
3. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
4. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús, 300 m2 fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
5. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
6. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
7. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m2, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd.
8. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
9. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
10. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 m til hægsta punkt við útvegg.
11. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
12. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 4, 6, 7, 8, 9 og 10, og fyriskipað, at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Endaliga serstaka byggisamtyktin er ikki vorðin orðað enn, men er ætlanin at fáa hetta gjørt sum skjótast, soleiðis at uppskotið kann leggjast til almenna hoyring eftir politisku viðgerðina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir,* journal nr: 21/04713
- *Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn,* journal nr: 22/07300
- *Fyrispurningur um undantak at byggja íbúðir í tveimum hæddum á matr. nr. 1354a, Tórshavn,* journal nr: 25/04127

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í mál nr. 21/04713, Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir, varð samtykt at sølukostnaðurin fyri lendið skuldi ganga inn í kostnaðin av avleiddu verkætlanunum, so sum at gera vegin í fullgóðum standi, at knýta kloakk og aðrar leiðingar til økið.
Tekniska deild arbeiðir við hesum avleiddu verkætlanum, soleiðis at mennarar av økjunum kunnu knýta verkætlanirnar í kommunalu leiðingarnar, tá tað er komið hartil.

**Skjøl**

- *25/02294-7 – Uppskot fyri matr. nr. 1354a og 1354b*

- *25/02294-6 – Uppskot fyri matr. nr. 1355 og 1356*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við:
- at umsitingin fer undir at gera serstaka byggisamtykt fyri matr.nr 1356, 1355, 1354a, 1354b, 1357b, við Villingardalsvegin, Tórshavn, til bygging av íbúðum sambært viðheftu skjølum,
- at serstaka byggisamtyktin verður send til hoyringar, so skjótt hon er liðugt gjørd og samtykt
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála tóku undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøddi ímóti.

Ein annar minniluti, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson, atkvøddi blankt.

Málið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og 4 blonkum atkvøðum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt uppskot um serstaka byggisamtykt við Villingadalsvegin (sí *Serstøk byggisamtykt við Villingadalsvegin*), og hevur uppskotið ligið frammi til almenna hoyring í tíðarskeiðnum millum 2. juli og 2. september 2025. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan onga viðmerking móttikið, og varð uppskotið sent Umhvørvismálaráðnum til endaliga viðgerð.

Í skrivi frá Umhvørvismálaráðnum (sí *Skriv frá Umhvørvismálaráðnum*) verður staðfest at málið má ganga umaftur, av tí at endaliga uppskotið til sertaka byggisamtykt fyri Villingadalsvegin ikki var samtykt, áðrenn tað var lagt til alment eftirlit. Tískil verður endaliga uppskotið upp á serstaka byggisamtykt hervið lagt til politiska støðutakan.

**Nýggj skjøl**
25/02294-10 Serstøk byggisamtykt við Villingadalsvegin
25/02294-13 Skriv frá Umhvørvismálaráðnum

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til,

- at byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við uppskotinum um serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1356, 1355, 1354a, 1354b og 1357b sambært skjalinum 25/02294-10 *Serstøk byggisamtykt við Villingadalsvegin*, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

# 227/25 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes - 22/04933

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 133/25 | 25/01098-6 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 227/25 | 25/01098-6 |

**Samanumtøka av málinum**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær gjørdust partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdardám og tílíkt.

Hetta málið er eitt framhald av málinum 22/04933, har byggisamtyktin fyri Hvítanes verður viðgjørd. Sí upprunamálslýsing í skjali nr. *25/01098-10, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes*.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum verður mælt til, at Hvítanes fær sína egnu almennu byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Hvítanes, eru hesi ymisku økini í bygdini:
A: Miðstaðarendamál
B: Sethúsabygging
E: Almenn endamál
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst
F: Neyst og bátapláss
Onnur endamál

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:
A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús

4. gr.: Landbúnaður

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í upprunaliga málinum um Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes (22/04933) og síggjast í skjalinum *Hvítanes økisásetingar - áðrenn og eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot um nýggja byggisamtykt fyri Hvítanes varð samtykt í býráðnum 30. mai 2024 og fór til almenna hoyring millum 18. september og 30. oktober 2024. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið tvær viðmerkingar frá borgarum, umframt viðmerkingar frá náttúrufriðingarnevndini.

***Viðmerking 1 (sí Viðmerking til broyting í byggisamtykt fyri Hvítanes,msg)***
Grundstykkið 125b er sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum um endurskoðan, partvíst í sethúsaøki og partvíst í 4. grundumráði. Í skrivinum verður heitt á býráðið at rætta kortskjalið, soleiðis at matr. nr 125b verður heilur innan fyri sethúsaøki A.

***Viðmerking 2 (Mótmæli til broyting av byggiøkið á matr 98.docx)***
Mótmælt verður at broyta part av matr. nr 98, til byggilendi (sethúsaøki A). Í mótmælinum verður grundgivið ímóti hesi broyting út frá, at bygging á matr. nr 98 er innan fyri 100 m frá bakkatromini á fjøruni í Akkersvík, og krevur sambært § 2 stk. 2 nr. 1 í náttúrufriðingarlógini loyvi frá friðingarmyndugleika. Víst verður á, at villdunnur, æðupør og sjófuglur reiðrast í nærøkinum, og at økið verður nógv vitjað av ferðafólki.

Mælt verður tí heldur til at broyta matr. nr 98 og atliggjandi matr. nr 108a við Akkersvík til D1-Frílendi til tess at verja serstaka náttúruøkið.

***Viðmerkingar frá náttúrufriðingarnevndini (sí 5600-88130-00059-24 - Útskrift úr gerðabókini.pdf)***
Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu letur tað vera upp til Tórshavnar kommunu og góðkennandi myndugleika at økja um A1 øki fyri matr. nr. 125b, men ger vart við ásetingar í náttúrufriðingarlógini § 2 stk. 2 nr. 3 um, at ikki er loyvt innangarðs at byggja nærri enn 300 m at áum, sum eru meira enn 4 m breiðar í botninum. Á Hvítanesi er nærmasta sethúsabygging umleið 10 m frá ánni í gomlu bygdini. Við atliti til verandi bygging ásetur nevndin tí, at ikki kann byggjast nærri enn 10 m frá áum, sum eru minst 4 m breiðar á Hvítanesi.

Viðv. viðmerking 2 staðfestur náttúrufriðingarnevndin, at økið talan er um (matr. nr 98), er nærri enn 100 m frá fjøruni ella bakkanum við Akkersvík, á Kortal.fo mált til at vera frá áleið 40 m til umleið 60 m frá fjøruni. Nevndin kann ikki geva undantak ella loyva bygging á matr. nr. 98, vísandi til nevndu ásetingar í lógini.

Harafturat tekur náttúrufriðingarnevndin ikki undir við at broyta ásetingar fyri nýtt neystaøki, har loyvt er partvíst at innrætta frítíðarhús á matr nr 118 við mølina/Gjónna á Hvítanesi, fyrr enn ítøkiligar tekningar eru komnar nevndini í hendi. Grundgevingin er, at økið er nærri bakkatromini enn 100 m og fevnt av ásetingunum í § 2 stk. 2 nr. 1 í náttúrufriðingarlógini, og tí at nevndin ivast í, hvussu bygging á staðnum kemur at taka seg upp í landslagnum so nær sjóvarmálanum, tí um veturin kann tað vera sera stórur uppgangur av brimi inn yvir økið, har neystaøkið og øki til frítíðarhús ætlast at verða.

Náttúrufriðingarnevndin ynskir tískil at síggja tekningar og visualiseringar av ætlanini, áðrenn avgerð kann takast.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***

Umsitingin hevur viðgjørt viðmerkingarnar og mælir til, partvíst at ganga viðmerkingunum á møti, soleiðis at uppskotið um endurskoðan verður dagført sambært nýggja kortskjalinum *Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025.*

Í nýggja uppskotinum eru matr. nr 98 og matr. nr 108 varðveittir í 4. grundumráði, og ikki D1 øki, sum mælt varð til sambært Viðmerking 2. Orsøkin er, at verandi áseting (landbúnaðarøki) loyvir ikki bygging, og tænir harvið endamálinum um at verja serstaka dámin við og kring Akkersvík.

Neystaøkið varð í fyrra uppskotinum víðkað sambært markinum á matr. nr 118. Uppskotið var ikki grundað á ítøkiliga byggiætlan, men heldur ein staðfesting av verandi umstøðum, og er kommunan ikki til reiðar við ítøkiligari ætlan fyri, hvussu byggjast skal fram við leiðini oman á støðna/dráttin. Mælt verður tískil til at rætta markið við neystaøkið til upprunaliga/galdandi økið, og at D1 verður galdandi fyri part av matr. nr 118. Ásetingin fyri neystaøki (E) verður broytt sambært upprunaliga broytingaruppskotinum, og verður nýggja ásetingin, sum loyvir partvísa innrættan til frítíðarbústað galdandi fyri neystini, sum í dag standa á økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 22/04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes
- 20/04243 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar

**Skjøl**

Jr nr. 22/04933-5 - *Serstøk byggisamtykt fyri Hvítanes - áðrenn broyting*
Jr nr. 22/04933-3 - *Hvítanes - endurskoðað 11.01.24*
Jr nr. 22/04933-2 - *Hvítanes økisásetingar - áðrenn og eftir broyting*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – áðrenn broyting*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – eftir broyting, Uppskot til fyrru hoyring*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025*
Jr nr. 22/04933-9 - *Viðmerking til broyting í byggisamtykt fyri Hvítanes.msg*
Jr nr. 22/04933-10 - *Mótmæli til broyting av byggiøkið á matr 98.docx*
Jr nr. 22/04933-4 - *5600-88130-00059-24 - Útskrift úr gerðabókini.pdf*
Jr nr. 25/01098-10, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum, *25/01098-9 - Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025*, við hesum broytingum:

- Matr. nr 98 verður verandi í 4. grundumráði.
- A1 økið verður víðkað, soleiðis at tað fylgir matr. nr. 125b.
- Markið fyri neystaøkið E verður rættað, soleiðis at tað fylgir markinum fyri verandi neystaøki.

- og at beina málið í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

# 228/25 Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 78/25 | 25/04664-4 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 128/25 | 25/04664-4 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.09.2025 | 122/25 | 25/04664-4 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 210/25 | 25/04664-4 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.10.2025 | 143/25 | 25/04664-4 |
| 6 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 228/25 | 25/04664-4 |

**Upprunin til málið**
Í 2021 varð samtykt at fara undir útstykking oman fyri Argjahamar, sí gamla málið, j.nr. *21/01777*, *Útstykking oman fyri Argjahamar,* og nýggja málið j. nr. *25/04323, Útstykking oman fyri Argjahamar – 21/01777.*
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri økið kunnu útstykkingar bert gerast sambært serstakari byggisamtykt. Serstøk byggisamtykt varð samtykt og hevur verið galdandi síðani september 2024. Sí j.nr. *25/04664-10, Galdandi serstaka byggisamtykt omanfyri Argjahamar.*

Ávegis verkætlanir í økisparti A (sethúsaøkið) og økisparti B (øki til almennan stovn) hava víst seg at krevja, at ávísar ásetingar at verða broyttar og/ella nágreinaðar. Sí j.nr. *25/04664-9, Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Við markeraðum rættingum.*

**Lýsing av málinum**
Galdandi serstaka byggisamtyktin er gjørd út frá eini heildarætlan, við rúm fyri umleið 190 bústøðum í sethúsum, raðhúsum og íbúðum. Endaliga talið av bústøðum er treytað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum. Harumframt er eitt øki lagt av til bústovn/sambýli og eitt øki lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Ætlanin er býtt í 6 økispartar, har ymsar ásetingar eru galdandi, og leggur serstaka byggisamtyktin upp til, at heildarætlanir vera gjørdar fyri hvønn økispart sær.

Í samband við at heildarætlan fyri stovnin í øki B verður fyrireikað, verður mett hóskandi at økja um hæddarásetingarnar, soleiðis at mest loyvda hædd verður økt úr 10 m upp í 12,5 m. Somuleiðis verður mett ráðiligt, at strika áseting um mest loyvdu hæddir. Uppskotið um broyting er grundað á funktiónina á bygningum, ætlaður fólki við autismu. Bygningurin skal kunna veita friðaligar umstøður, og tað verður mett skynsamt at leggja tekniskar leiðingar (ventiliatión) høgt undir mønina. Sambært dagførdari heildarætlan fyri økið B, verður fasaduhæddin væl lægri enn 10 m, meðan mønuhæddin verður økt. Økta hæddarásetingin verður ikki mett at hava merkisverda ávirkan á ljósviðurskiftir í økinum.

Umsitingin metir eisini, at tað er hóskandi at nágreina ásetingar í øki A (sethúsaøkið), soleiðis at húsini fáa somu treytir sum sethúsaøkið í Klingurstjørn. Hetta verður gjørt við at loyva húsunum niðan fyri vegin at leggja 0,1 afturat byggistignum, sum kann nýtast til kjallara undir bilhúsi.

Ásetingar viðvíkjandi mest loyvdu hæddum verður eisini dagført, soleiðis at hesar samsvara við útstykking á Klingurstjørn.

Fyri at tryggja ein dám, sum ikki víkir frá Viðargøtu, Leitisgøtu og Rygsgøtu, har øll sethúsini eru bygd við longru útveggjasíðuni javnfjart við vegin, verður orðing løgd afturat, sum hevur til endamáls at tryggja ein framhaldandi dám í nýggju útstykkingini. Uppskot um tílíka orðing ljóðar soleiðis:

*Sethús skulu staðsetast soleiðis, at mønan og longra útvenda veggjasíðan stendur javnfjar við høvuðsvegin. Um sethúsini ikki hava mønu, skulu tey stillast, soleiðis at longra útvenda veggjasíðan er javnfjar við høvuðsvegin. Har*

*høvuðsvegurin vendir, kunnu sethúsini staðsetast við skjøldri móti vegi, soleiðis at longra útvenda veggjasíðan fylgir lendishallinum. Sí skjal 2 fyri vegleiðandi skipan av øki A.*

At enda mælir umsitingin til at dagføra hesi skjøl:

- Skjal 2 (Økisuppdeiling) verður rættað, soleiðis at linjur í økisparti A vísa til viðmælta staðseting av sethúsum. Bygningslinjur í økisparti C, D, E og F verða strikaðar, av tí at nágreinilig heildarætlan enn ikki er tøk.
- Heildarætlan fyri økispart B (almennur stovnur) verður løgd afturat sum skjal 4.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk, og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur,* jnr: 22/07317
- *Útstykking oman fyri Argjahamar.* jnr: 21/01777

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Galdandi serstaka byggisamtykt omanfyri Argjahamar*, jnr. 25/04664-10
- *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Dagført uppskot*, jnr. 25/04664-10
- *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Við markeraðum rættingum*, jnr. 25/04664-9

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagføring av serstøku byggisamtykt oman fyri Argjahamar sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Dagført uppskot,* og beina málið í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Eftir kunningarfundin 12.05.2025 fyri grundstykkjaeigarar í útstykkingini oman fyri Argjahamar varð umsitingin gjørd varug við, at orðingar í ásetingini fyri øki A (Sethúsaøkið), kunnu misskiljast, og tí er neyðugt at rætta uppskotið, sum varð samtykt á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 5. mai 2025.

Talan er um áseting, sum hevur til endamáls at tryggja sethúsadámin í mun til Viðargøtu, Leitisgøtu og Rygsgøtu, og sum í uppskotinum verður orðað soleiðis, at longra útvenda veggjasíða er javnfjar vegnum. Henda orðing verður rættað (sí skjal Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir), soleiðis at ásetingin tryggjar, at takhallið á mønu fylgir vegnum og lendishallinum. Hetta verður mett at vera ein meira hóskandi áseting til tess at tryggja dámin.

Harafturat er orðing um sethús við sløttum taki tikin úr uppskotinum, og er endamálið við hesum somuleiðis at varðveita dámin. Ynskiligt er, at sethúsini sum minst verða bygd við slættari tekju, hetta tí at tað verður mett, at sethús við sløttum taki ikki hóska til brattlendið og verandi bygging norðan fyri nýggju útstykkingina.

**Nýggj skjøl**
- *Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir,* jnr. 25/04664-12

Omanfyrinevndu broytingar vórðu sendar við telduposti til limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, og hava allir limirnir svarað aftur við telduposti ella telefon, at tey taka undir við broytingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagføring av serstøku byggisamtykt oman fyri Argjahamar sambært skjalinum *jnr. 25/04664-12 Dagføring av serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256 Argir*.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Fyrst varð atkvøtt um eitt uppskot frá Kára Johansen um at beina málið aftur í nevnd.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og einari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið við teimum broytingum, sum vórðu gjørdar eftir kunningarfundin 12. mai 2025.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Ongin

Málið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti**

Broytingaruppskotið (skjal *25/04664-12*) varð lagt út til almenna hoyring 28. mai 2025, og var upprunaliga freistin at viðmerkja 9. juli 2025. Eftir kunnandi fund við eigarar í øki A, varð avgjørt at leingja freistina til 10. august 2025.

Tá hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið 10 viðmerkingar. Øll mótmælini snúgva seg um broytingar í øki A, og er tí uppskotið um at økja mest loyvdu hædd í øki B, umframt nýggja fylgiskjal 4, sent Umhvørvismálaráðnum til endaliga viðgerð.

Niðanfyri er yvirlit og samanumtøka av móttiknu viðmerkingunum:

| Avsendari | Mótmæli/viðmerking |
|---|---|
| Mótmælari 1 | Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m<br>Ynskir at varðveita áseting um eyka nýtslustig |
| Mótmælari 2 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum |
| Mótmælari 3 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m<br>Mótmælt verður at frástøðan frá marki skal økjast við somu longd sum hægsta punkt við útvegg er hægri enn 6 m |
| Mótmælari 4 | Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 5 | Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 6 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 7 | Ynskja at loyva atkomu til Glyvursvegin<br>Eyka nýtslustig á ovasta vegi (linju 5) |
| Mótmælari 8 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 9 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 10 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |

Samanumtikið snúgva mótmælini seg um hesi viðurskifti:

1. Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd niðan fyri vegin úr 9 m til 7 m.
2. Mótmælt verður, at frástøðan frá marki skal økjast við somu longd sum hægsta punkt við útvegg er hægri enn 6 m.
3. Mótmælt verður um krav, at húsamøn skal fylgja høvuðsvegi og takhall skal fylgja lendinum.
4. Ynski um at loyva atkomu til Glyvursvegin.
5. Endurgjaldskrav.

**Til nr. 1: Mótmælini um at lækka mest loyvdu hædd niðanfyri vegin úr 9 m til 7 m**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:

- Ásetingin avmarkar eigarum at byggja fleiri sløg av typuhúsum, eitt nú frá Norðsetur og Brigada.
- Ásetingin avmarkar tilfarsnýtslu til tekjusløg, av tí at tað verður kravt at byggja við einum halli á 14 stig, um tekjan verður bygd úr aluminium ella eternitt. Hervið gerst tað truplari at velja bíligaru og meira

vanligu loysnirnar, sum eisini er vanlig søluvøra hjá føroysku byggibúðunum. Fyrimunur verður sostatt givin til ávísar takloysnir, so sum takpapp og takdúk, har eingi krøv eru til hallið á tekjuni.

- Avmarkaða hæddin ger tað í ávísum førum ómøguligt at installera eitt ventilatiónsaggregat á loftið, og tískil avmarkar hetta møguleikan fyri mekaniskari ventilatión í húsinum, og tað stríðir móti BK17.
- Tað er órímiligt, at hús oman fyri veg, sum í fleiri førum eru niðan fyri onnur hús, sleppa at byggjast hægri og harvið kunnu avmarka útsýnið. Í mótmæli (sí skjal 25/04664-17) verður út frá planeringskotu og halli grundgivið fyri, at ásetingin og lítli hæddarmunurin kann hava neiliga ávirkan á útsýnið/sólarljós á hús, ið verða bygd sambært broytingaruppskotinum niðan fyri vegalinju 4 og oman fyri vegalinju 3.

*Svar frá umsitingini:*
Umsitingin ásannar ótilætlaðu avleiðingarnar av hæddaravmarkingini, soleiðis sum uppskotið fyriliggur, og metir, at tað út frá grundgevingum omanfyri er ráðiligt at venda aftur til upprunaligu hæddarásetingarnar fyri øll hús í øki A.
Lendishallið og skipanin av útstykkingini tala ikki fyri stórvegis differentiering fyri bygging niðan fyri og oman fyri veg.
Eykabyggistigið á 0,1 og økt nýtslustig úr 0,6 til 0,8 var eisini grundað á galdandi áseitngar fyri útstykkingina við Klingurstjørn, har hús oman fyri vegin kunnu byggjast hægri, meðan hús niðan fyri vegin kunnu byggja eina hædd undir bilhúsi, og mælir umsitingin til, somuleiðis at taka hesar ásetingar úr og venda aftur til galdandi áseting.

**Til nr. 2: Mótmælt verður, at um hægsta punkt við útvegg er meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.**

*Svar frá umsitingini:*
Í mótmælinum verður ikki víst á ítøkiliga grundgeving, men kann vísast á, at henda ásetingin søguliga hevur verið galdandi fyri sethúsaøkir í Almennu byggisamtyktini til tess at tryggja betri ljósviðurskiftir millum hús, har einvegis takhall kann elva til at útveggur verður bygdur hægri enn 6 m.
Líknandi treytir eru í galdandi bygningskunngerðini, og verður tískil mælt til at taka hesa ásetingina úr serstøku byggisamtyktini.

**Til nr. 3: Mótmælini um krav, at húsamøn skal fylgja høvuðsvegi og takhall skal fylgja lendinum:**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:

- Kravið avmarkar somuleiðis møguleika hjá eigarum at velja ymisk typuhús, har fleiri hava takhall og mønu, sum ikki er einføld at venda í mun til støddarlutfallið á matriklunum.
- Talan er ikki um eina lítla tillaging, men eina grundleggjandi avmarking.

*Svar frá umsitingini:*
Endamálið við orðingini er at taka fagurfrøðilig atlit. Nýggja útstykkingin verður knýtt í verandi útstykking á Argjahamri, har flestallar tekjur hava mønur, ið eru javnfjarar vegunum. Somuleiðis verður mett, at byggingin fellur betri í lendi, tá takið fylgir lendishallinum.
Útstykkingin kemur at verða sera sjónlig frá stórum parti av býnum, og húsini koma bæði at sýnast minni og kunnu skapa betri ljósviðurskiftir millum vegirnar.
Av hesum ávum verður mælt til at halda fast við hesa áseting.

**Til nr. 4: Ynski um at loyva atkomu til Glyvursvegin**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:
Grundstykkjaeigari oman fyri ovasta vegin í øki A ynskir at hava møguliga innkoyring umvegis Glyvursvegin. Grundgivið verður fyri, at hetta kann minka um ferðsluna millum húsini.
Í hesum sambandinum verður eisini skotið upp, at byggistigið verður økt við 0,1, eins og niðan fyri vegin.

*Svar frá umsitingini:*
Tað er ikki ráðiligt at loyva atkomu til ovastu húsini umvegis Glyvursvegin, av tí at Glyvursvegurin ikki er ætlaður sum ein býlingsvegur, og at tað tískil av trygdarávum verður frámælt at hava íbindingar til sethús.
Ynskið um økt byggistig á ovastu vegunum er tískil ikki ráðiligt.

**Til nr. 5: Endurgjaldskrav**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:
Tríggjar av viðmerkingunum leggja dent á, at um hildið verður fast í avmarkandi ásetingunum, verður endurgjald kravt fyri fyrireikandi arbeiðið, so sum greinan av byggimøguleikum, sniðgeving, keyp av tekningum og rágeving, sum hevur verið til fánýtis, um byggisamtyktarbroytingin kemur í gildi.

- Eigarar hava keypt grundstykki í góðari trúgv, grundað á galdandi byggisamtykt og reglur. At seta grundleggjandi avmarkingar eftir keypið av grundstykkinum, er ikki bert órímiligt, men eisini eitt brot á sáttmálan.
- Broytingar í byggisamtyktini so seint í tilgongdini eiga at geva fríari treytir heldur enn at vera avmarkandi.
- Undantaksloyvi eigur at vera givið til eigarar, sum hava fyrireikað sambært galdandi reglum áðrenn broytingaruppskotið.

*Svar frá umsitingini:*
Tað kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri tey, sum eru komin ávegis í at fyrireika bygging, sum vegna broytinginar í byggisamtyktini ikki lata seg gera longur. Við endurgjaldskrøvum kann hetta møguliga eisini fáa fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa. Torført er at meta um í núverandi støðu, hvussu stórt endurgjaldið kann gerast.

Viðv. at geva eigarum, sum hava gjørt fyrireikandi arbeiði, undantaksloyvi, so er hetta ikki ein møguleiki hjá byggivaldinum, tá talan tá helst er um stór undantaksloyvir.

Umsitingin hevur tikið hetta til eftirtektar og hevur tí tikið fleiri av broytingunum aftur, soleiðis at byggisamtyktin ikki kemur at darva verandi framda arbeiði. Mett verður tó, at tað býarskipanarliga er vert at halda fast í kravinum um takhall, vísandi til grundgevingarnar omanfyri.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Um broytingaruppskotið verður tikið fult aftur, merkir hetta, at áseting um javnfjara møn somuleiðis fellur burtur.
Um tillagaða broytingaruppskotið verður samtykt, sum umsitingin mælir til (sí skjal *Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, rættað 15.09.2025*, jnr. 25/04664-33), har hildið verður fast við kravið um, at mønan skal vera javnfjar høvuðsvegi og takhall skal fylgja lendinum, og har aðrar ásetingarnar fyri øki A verða sambært upprunaligu/galdandi byggisamtykt, skal nýggja uppskotið leggjast aftur til almenna hoyring í 6 vikur.

**Nýggj skjøl**
Jnr. 25/04664-33 Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, rættað 15.09.2025
Jnr. 25/04664-34 Hoyringsskriv samlað

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja tillagað broytingaruppskot, sambært skjalinum *Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, rættað 15.09.2025*, jnr. 25/04664-33, har hildið verður fast við kravið um, at mønan skal fylgja vegnum, men at bygging í øki A annars samsvarar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. september 2025:** Útsett.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. oktober 2025:** Anja Weyhe og Heidi Lava Elgeirsdóttir taka undir við tilmæinum.

Bergur Robert Dam Jensen og Birgir Nielsen taka ikki undir við tilmælinum, grundað á at hetta grundleggjandi broytir treytirnar, ið stykkini eru seld við.

**Ískoyti:**
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini hevur borgarafundur verið við keyparnar av sethúsastykkjunum. Fleiri sjónarmið vóru frammið á fundinum um broytingarnar í serstøku byggisamtyktini, sum vóru til hoyringar í tíðarskeiðinum 28. mai 2025 til 10. august 2025.

Serliga varð lagt fram, at tað var óheppið at ásetingarnar fyri økið verða broyttar so seint í tilgongdini. Umsitingin ásannar avbjóðingina, og hevur tískil mælt til at strika allar tær serligu ásetingarnar um hægri byggistig niðanfyri vegin og hægri bygging omanfyri vegin. Tó verður hildið fast í ásetingini um, at byggjast skal javnfjarð við vegin og mønan skal fylgja lendinum, sum fylgiskjal nr. 2 í serstøku byggisamtyktini sýnir.

Borgarar førdu m.a. fram:

- At tað gott kundi gerast munur á stykkjunum omanfyri og niðanfyri vegin. Serliga vóru tað eigarar niðanfyri vegin, sum mettu, at tað var í lagi, at tey fingu eitt hægri byggistig undir bilhúsinum niðanfyri vegin.
- Somu eigarar vístu á, at hóast nøkur einkult stykkir vildu mist útsýnið við at stykkini omanfyri vegin fingu lov at byggja hægri, so skuldi tað ikki ganga útyvir øll og serliga tey niðanfyri vegin, sum vildu fingið gott burturúr einum hægri byggistigi undir bilhúsinum.
- Onkur legði upp til, at tað skuldi gerast ein atkvøðugreiðsla í mun til hvørjar ásetingar skuldu galda fyri økið.
- Onkur spurdi inn til um ikki øll kundu fáa eitt hægri byggistig.

Samanumtikið, so er torført at finna ein gyltan millumveg, tí tað vilja altíð verða borgarar, sum vilja hugsa, at teirra áhugamál ikki eru tikin við. Í fleiri viðmerkingum hevur verið ført fram, at tað er so dýrt at byggja, og at tað ikki verður tikið nóg stórt atlit til tey sum ynskja at byggja eini sniðhús.

Grundstykkini eru um 400 fermetrar til støddar, og loyva ásetingarnar í almennu byggisamtyktini eina bygging, har Byggistigi ikki skal fara upp um 0,3 og eitt nýtslustig, sum ikki skal fara upp um 0,6. Hetta merkir, at byggjast kunnu eini sethús á 240 fermetrar, sum kann metast sum eini stór sethús.

Umsitingin vil tí framhaldandi vísa til tilmælið, sum varð lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina 6. Oktober 2025, sum er soljóðandi:

*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja tillagað broytingaruppskot, sambært skjalinum Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, rættað 15.09.2025, jnr. 25/04664-33, har hildið verður fast við kravið um, at mønan skal fylgja vegnum, men at bygging í øki A annars samsvarar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og beina málið í býráðið.*

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Kári Johansen biður um at koyra málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Kára Johansen at koyra málið aftur í nevnd.

Fimm atkvøddu fyri og átta atkvøddu ímóti í málinum, sum sostatt fall.

Fyri atkvøddi: Sunnuva Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen, tekur undir við broytingaruppskotinum.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála, tekur ikki undir við broytingaruppskotinum.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Sunnvá Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen,Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Fyri atkvøddi: Annita á Fríðriksmørk.

Málið varð sostatt felt við tólv atkvøðum í móti og einari atkvøðu fyri.

Tróndur Sigurðsson vil hava viðmerkt í gerðabókina, at hann als ikki tekur undir við teimum broytingum, sum eru í serstaku byggisamtyktini og mælir til, at hildið verður fast í teimum treytum, sum borgararnir fingu upplýst, tá teir fingu tillutað grundstykkini.

# 229/25 Nýggj byggisamtykt fyri Koltur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 135/25 | 25/04465-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 229/25 | 25/04465-1 |

**Upprunin til málið**
Tjóðsavnið hevur ábyrgd av Koltri, sum er partur av Tórshavnar kommunu. Tjóðsavnið hevur í nógv ár arbeitt við Koltursætlanini, og er ætlanin nú komin so væl áleiðis, at klárt er at gera byggisamtykt fyri økið.

Koltur skal verða ein granskingarstøð viðv. mentanar- og náttúruarvi. Hetta er verkætlan, sum landið hevur sett á breddan.

**Lýsing av málinum**
Koltur goymir nakað av mest serstaka mentanararvinum, vit eiga, og sigur søguna um lívskorini í Føroyum frá miðøldini og fram til nútímans føroyska fiskivinnusamfelagið. Í stuttum er ætlanin at skipa oynna sum eina granskingarstøð viðv. mentanar- og náttúruarvi, at menna eina burðardygga ferðavinnu og at skapa karmar fyri burðardyggum vinnulívi. Í sunnara partinum av oynni verða bygdarlag, bøur og hagi, og er ætlanin at endurreisa bygningar, byggja vitjunardepil, bátasmiðju, og skapa karmar fyri framsýningum, undirvísingartilboðum og mentananarsøguligum upplivingum sum heild.

Ítøkiliga eru tað tríggir bygningar, ið skulu byggjast/umvælast – Garðurin, nýbygningur, ið er staðsettur longur burturi frá sethúsunum Norðuri í Gerði; Lonin, nýbygningur, ið er staðsettur longur burturi frá sethúsunum; og síðani sjálv sethúsini, ið skulu umvælast.

Í norðara partinum er ætlanin at seta á stovn eina náttúrupark og náttúrugrannskingarstøð. Ein langtíðarætlan verður gjørd, sum skal lýsa, hvussu náttúran verður broytt frá tí verandi mentanarlandslagnum aftur til órørda náttúru.

Talan er sostatt um ein heilt serstakan part av kommununi, og tekur uppskotið til byggisamtykt fyri økið beinleiðis støði í Koltursætlanini, og víst verður til hesa í byggisamtyktini.

Nærri lýsing av verkætlanini sæst í skjali nr. 25/04465-2, *Koltursætlanin_SNA.*

Umframt heimild at fremja Koltursætlanina, so heimilar byggisamtyktin eisini, at atløgubryggja og tyrlupallur verða gjørd í Koltri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Koltur varð, eins og hinar bygdirnar í kommununi, fram til 2023 fevndur av ásetingum fyri 4. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í 2023 varð almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu endurskoðað, og í hesum sambandi vórðu allar bygdirnar í kommununi tiknar úr ásetingini í 4. grundumráði, og serskiltar byggisamtyktir fyri bygdirnar skuldu gerast. Hesar eru ávegis at verða gjørdar, og henda byggisamtyktin er soleiðis partur av tí størra arbeiðinum at gera serskiltar byggisamtyktir fyri bygdirnar í kommununi.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Koltursætlan*, journal nr. 22/00491
- *Kommununnar leiklutur í Koltursætlanina*, journal nr. 25/00607
- *Umsókn um byggiloyvi til Koltursverkætlanina hjá Tjóðsavninum í Koltri*, jounarl nr. 25/03986

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Uppskotið til byggisamtykt fyri Koltur er gjørd við støði í Koltursætlanini, sum Tjóðsavnið hevur latið gjørt.

Landsverk hevur latið upplýsingar viðvíkjandi tyrlupallinum.

Tá uppskotið verður lagt til almenna hoyring, verður uppskotið somuleiðis sent Tjóðsavninum og Landsverki til hoyringar.

**Skjøl**
- *Koltursætlanin_SNA*, journal nr. 25/04465–2.
- *Arkitektonisk frágreiðing*, journal nr. 25/04465-9.
- *Almenna byggisamtyktin fyri Koltur,* journal nr. 25/04465-10.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til almenna byggisamtykt fyri Koltur og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

# 230/25 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við A.C. Evensgøtu, Sólteig og Djóna í Geilgøtu, matr. nr. 704a, 703c, 703d, 705q, 705x, 705f, 705d og 705c, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 134/25 | 25/08473-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 230/25 | 25/08473-1 |

**Upprunin til málið**
Borgari hevur víst á, at tað er ósamsvar millum almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtykt nr. 7 fyri matriklarnar 703c, 703d, 704a, 705d, 705c, 705f, 705q, 705x, 707a, 707c, 708a, 712a, 712b, 712c, 713e, 713f, 714m og 714n, Tórshavn. Í almennu byggisamtyktini liggja matriklarnir sum D3 øki, sum er øki ætlað almennum stovnum og í serstøku byggisamtykt nr. 7 liggja matriklarnir í A1 øki, sum er øki til sethús.

Tá serstakar byggisamtyktir verða gjørdar, skulu tær altíð verða í samsvari við ásetingarnar í almennu byggisamtyktini. Til ber antin at seta meira avmarkandi ásetingar, enn tað er ásett í almennu byggisamtyktini, ella meira víttfevnandi ásetingar, enn tað er ásett í almennu byggisamtyktini. Um so er, at talan er um meira víttfevnandi ásetingar, enn loyvt er í almennu byggisamtyktini, skal tað altíð vera tilskilað í almennu byggisamtyktini, hvørjum ásetingum víkjast kann frá.

Í hesum førinum er talan um eitt frávik í serstøku byggisamtyktini, sum ikki er heimilað/tilskilað í almennu byggisamtyktini, og eigur hetta tískil ikki at vera møguligt. Hetta setur kommunu og borgara í eina sera óhepna støðu, av tí at tað ikki ber til at staðfesta, hvør samtykt er galdandi á ognunum, og tað sostatt ikki ber til at geva nøkur loyvi sambært byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
Í gomlum skjølum sæst, at í upprunaligu serstøku byggisamtykt nr. 7, sum er frá 1973, liggja matriklarnir í sethúsaøki, sí skjal *SB - 1972*. Í almennu byggisamtyktini frá 1972 liggja matriklarnir somuleiðis sum sethúsaøki, sí skjal *AB - 1972*, tað merkir, at tá serstaka byggisamtyktin varð gjørd, var hon í samsvari við almennu byggisamtyktina.

Í kortskjølum av almennu byggisamtyktini fram til 1982 sæst, at matriklarnir liggja sum sethúsaøki, sí skjal *AB - 1982*. Tey næstu nógvu árini eftir hetta hava vit ikki skannaði kort av almennu byggisamtyktini, men í korti frá 2017 sæst, at økið er broytt til almennar stovnar. Soleiðis sæst, at broytingin í almennu byggisamtyktini er nýggjari enn serstaka byggisamtyktin, og er tað altso broytingin í almennu byggisamtyktini eina ferð eftir 1983, sum hevur gjørt, at báðar byggisamtyktirnar ikki samsvara.

Fyri at taka samanum:
- 1972 – matriklarnir liggja í sethúsaøki í almennu byggisamtyktini
- 1973 – matriklarnir liggja í sethúsaøki í serstøku byggisamtyktini
- Eina ferð millum 1982-2017 – matriklarnir broyttir til almennan stovn í almennu byggisamtyktini

Av tí at talan er um matriklar, sum eru partar av sethúsaútstykkingum og verða brúktir sum sethús í dag, verður mett ráðiligt at broyta matriklarnar aftur til A1 sethúsaøki í almennu byggisamtyktini, meðan serstaka byggisamtykt nr. 7 verður verðandi, sum hon er.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

Ásetingar fyri A1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7 eru m.a.:

- Við teimum undantøkum, ið eru nevnd niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg. Á hvørjari ogn kunnu ikki verða bygd uttan eini sethús, við í mesta lagi tveimum íbúðum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Í sambandi við at málið verður lagt til almenna hoyring, verður tað somuleiðis sent eigarum av matr. nr. 703c, 703d, 704a, 705d, 705c, 705f, 705q, 705x, 707a, 707c, 708a, 712a, 712b, 712c, 713e, 713f, 714m og 714n, Tórshavn, til hoyringar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *AB – 1972, journal nr. 25/08473-2.*
- *SB – 1972*, journal nr. 25/08473-2.
- *AB – 1982,* journal nr. 25/08473-2.
- *AB – 2025*, journal nr. 25/08473-2.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*, journal nr. 25/08473-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 703c, 703d, 704a, 705d, 705c, 705f, 705q, 705x, 707a, 707c, 708a, 712a, 712b, 712c, 713e, 713f, 714m og 714n, Tórshavn, frá D3 øki til A1 øki sambært kortskjalinum *Almenna byggisamtyktin - eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

# 231/25 Ábøtur á Gerðisbreyt á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.05.2025 | 24/25 | 25/05298-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.06.2025 | 14/25 | 25/05298-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 29.09.2025 | 56/25 | 25/05298-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 170/25 | 25/05298-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 231/25 | 25/05298-1 |
| 6 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 10.11.2025 | 20/25 | 25/05298-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/0424-1 Liðugtgerð av Gerðisbreyt, Velbastað.

**Lýsing av málinum**
Málið hevur sín uppruna í staðbundnu nevndini fyri Kirkjubø og Velbastað. Á ástaðarfundi á Grækarismessu 2025 varð víst á ymisk átøk, sum vóru staðfest í hesari raðfylgju:

1. Garður í norðurenda av vegnum
2. Kloakkleiðingar verða tyrvdar og stoyptar
3. Gøta millum Norðuri á Heyggi og Gerðisbreyt verður sett í stand
4. Gøta og gøtuljós millum Gerðisbreyt og á Stórheyggi
5. Fylla vendipláss
6. Tryggja benir

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið verður lagt fyri teknisku nevnd at heimila umsitingini til at fara undir prosjektering, so kostnaðarmeting kann gerast av hesum arbeiðum. Síðani skal bjóðast út samsvarandi við kostnaðarmeting av raðfestum arbeiðum innan fyri karmin á 1,5 mió kr. íroknað prosjektering og eftirlit av kto. 8175 Vegir (Íløgur).

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Skjal nr. 25/04241-2 Liðugtgerð av Gerðisbreyt, Velbastað

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitinigni at fara undir prosjektering, og at bjóða út samsvarandi við kostnaðarmeting av raðfestum arbeiðum innan fyri karmin á kr. 1,5 mió fíggjað av kto 8175 Vegir (Íløgur) at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. juni 2025:** Kunnað varð um málið. Nevndin vísti á, at benið eftir Gerðisbreyt skal fáa fyrstu raðfesting.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í framhaldi av samtykt í teknisku nevnd 05. mai 2025 boðið arbeiðið út til tveir arbeiðstakarar. Farið varð ikki undir at gera umfatandi lisitatiónstilfar, men í staðin var gjørt innanhýsis tilfar til undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Lisitatión varð hildin 1. september 2025 og vóru tilboðini hesi:
1) Hjálpirót kr. 1.042.161,81
2) Konsax kr. 777.925,00

Tilboðini vóru uttan mvg og vóru lægri enn upprunaliga kostnaðarmetingin hjá umsitingini álj. kr. 1.380.000.

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting við støði í lægra tilboðnum, skjal nr. 25/05298-7 álj. kr. 1.000.000.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81063 | Vegagerð Gerðisbreyt Velbastaður |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | L81062 | Vegagerð Gerðisbreyt Velbastaður | |

| **Upphædd** |
|---|
| Kr. 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kr. 10.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
1) taka av lægra tilboðnum og játta kr. 1.000.000 til arbeiðið, av løgukarmi ‘8175-LK81063 Vegagerð Gerðisbreyt Velbastaður’ inn á nýggja verkætlan ‘8175-L81062 Vegagerð Gerðisbreyt Velbastaður’
2) beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við málinum.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

## 232/25 Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 108/25 | 25/07379-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 143/25 | 25/07379-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 202/25 | 25/07379-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 232/25 | 25/07379-1 |

**Upprunin til málið**
Vánaliga inniluftin í bygninginum í Steinatúni, hevur verði ein trupulleiki í nógv ár. Seinastu 2-4 árini er trupulleikin versnaður, tí tað er farið at leka inn ígjøgnum bæði tekju og fasadur. Starvsfólk hava gjørt vart við seg fleiri ferð. Í samráð við trygdarnevndina leggur leiðslan tí fýra mál til politiska støðutakan:

- Hetta mál; 25/07379_Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún"
- Mál; 25/07477_Bráðflyting av Teknisku Fyrisiting til Sjóvinnuhúsið
- Mál; 25/07478_Flyting av KT- og Fíggjardeild
- Mál; 25/07479_Leigumál á fyrstu hædd í Steinatúni flytast

Málini hanga saman, men hava hvørt sítt tilmæli um játtan og víðari framferð.

**Lýsing av málinum**

*Bygningurin:*
Í 2013 keypti Tórshavnar Kommuna bygningin í Niels Finsens gøtu 15, frá táverandi BankNordik. Bygningurin, nú vanliga róptur "Steinatún", var innrættaður av nýggjum til skrivstovur til kommunala fyrisiting á trimum hæddum. Í dag heldur Tekniska fyrisiting til á fjórðu og triðju hædd, og KT- og Fíggjardeildin á aðru hædd. Fyrsta hædd var í 2016 og 2017 innrættað til trý leigumál, og innandura torg.

Upprunaligi bygningurin stóð liðugur í 1958, tá P/F Føroya Banki flutti inn. Bygningurin hevur øll árini, verið nýttur sum banka- og skrivstovubygningur.

Høvuðskonstruktiónin í bygninginum er jarnbetong við faststoyptum betongflísum á útsíðunum.
Bygningurin hevur onga bjálving í útveggjunum. Á innsíðuni á útveggjunum er "skinnið" einans ein tunnur forsatsveggur t.e. pláta á timburskelett.

Trappur eru í báðum endum av bygninginum, og nøkta tí minsta kravið til rýmingarleiðir. Gamla lyftan lýkur hinvegin ikki nútíðar krøv (BK 17) um felags atkomuveg.

Bygningurin hevur ikki mekaniska luftskiftisskipan, og upprunaliga hitaskipanin er ótíðarhóskandi.

*Standurin:*
Trupulleiki av ringari inniluft er staðfestur í fleiri kanningum av luftgóðsku og arbeiðsumhvørvi annars. Í fleiri ár hava trupulleikar verið av lekum. Kanningar av ávísum bygningslutum staðfesta, at álvarsamir fylgiskaðar kunnu standast av lekunum. Vætan millum skinn og hold elvir til soppavøkstur og harvið er inniluftin ótolandi fyri starvsfólk, sum arbeiða nærhendis har tað lekur ella hevur likið inn.

Virksemið á fyrstu hædd gevur nógvan hita frá sær, og tí hevur serliga onnur hædd havt trupulleikar av alt ov høgum hita. Á triðju hædd er vætan í luftini alt ov høg, og á fjórðu hædd (loftshæddin) er trupult at

regulera hita og kulda, alt eftir um tað er summar ella vetur. Samanumtikið er luftgóðskan ring, ikki minst tí at bygningurin er ov trongur til talið av starvsfólkum.

Í fleiri umførum eru smærri umvælingar gjørdar. Í 2022 vórðu fimm stór vindeygu skift á fyrstu hædd. Í 2024 og 2025 varð hol sett á forsatsveggir á triðju hædd. Staðfest var, at rennistokkar og sjálv kopartakrennan lekur í støðum. Blikksmiðurin, sum umvældi takrennuna, gjørdi hetta við tjøru, tí ikki bar til at lodda í verandi kopar, tí hetta er tunt og slitið við microholum í.

Í juli mánaði 2025 var Teknologisk Institut í bygninginum og gjørdi fleiri "destruktivar" kanningar av bygningslutum og arbeiðs- og inni umhvørvinum annars. Kanningin staðfestir at tað generelt er funnið "vækst af skimmelsvampe". Kanningin mælir til at *"Medarbejdere der oplever gener, bør få lavet en individuel lægefaglig vurdering af sammenhængen med den registrerede skimmelsvampevækst. Indtil der foreligger en afklaring bør medarbejdere med gener ikke have længerevarende ophold i bygningen".*

Kanningin mælir til at tryggja klimaskermin og síðani at útføra eina *"skimmelrenovering"* Eisini verður mælt til *"en grundig gennemgang af varmeanlægget, da der er tegn på at der er problemer med høje temperaturer i bygningen"*

Í juli 2025 sendi Trygdarnevndin fyri fyrisitingina út spurnarblað um sjúkueyðkenni. Spurnarblaðið varð sent til starvsfólk á aðru, triðju og fjórðu hædd. Umleið 80 % av starvsfólkunum svaraðu spurnarblaðnum. Deildin fyri almanna heilsu fer at greina tølini nærri. Pál Weihe luttók á kunningarfundi hin 26.08.2025 og vísti í hesum sambandi til omanfyri nevndu kanningar.

*Høvuðsmvæling*
Útsíður og tekjan eru í so mikið ringum standi, at neyðugt er at høvuðsumvæla "klimaskermin" t.e. alt uttara skalið. Væntandi skal kopartekjan skiftast og rennistokkar staðsetast uttaná fasaduna. Vindeygu og úthurðar við inndekningum mugu skiftast og gerast av nýggjum. Støða má takast til um flísafasadan skal varðveitast og umvælast í verandi ella broyttum líki.

Í mun til innrætting, atkomuviðurskifti og tekniskar installatiónir eigur hetta at lagast til eina ávísa nýtslu, soleiðis at hóskandi loysnir verða valdar. Nýggj lyfta eigur at verða gjørd, sum í minsta lagið lýkur krøvini til felags atkomuveg, umhugsast skal um lyftan eisini eigur at rúma eini ambulansubøru.

Tað er umráðandi at fyrireika høvuðsumvælingina væl og virðiliga.

Mælt verður til at gera skipanaruppskot, sum tekur støðu til framtíðar nýtslu og innrætting í bygninginum. Uppskotið eigur at taka útgangsstøði í "Urtagarðsbýnum", sum er heildarætlan, ið Býarskipanardeildin læt gera í 2022.

Samstundis kann nýggi klimaskermurin detailprosjekterast. Høvuðsumvæling av klima-skerminum kann møguliga bjóðast út fyri seg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- Mál; 25/07477_Bráðflyting av Teknisku Fyrisiting til Sjóvinnuhúsið
- Mál; 25/07478_Flyting av KT- og Fíggjardeild
- Mál; 25/07479_Leigumál á fyrstu hædd í Steinatúni flytast

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

| | Býráðsfundur<br>23. oktober 2025 | Blað nr.: 720<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/07379-3 Tíðarætlan
25/07379-2 Kanning frá Teknologisk Institutt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Víst verður til leysliga kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanin. Stór óvissa er tengd at verkætlanini, tí enn er ógreitt, hvat bygningurin fer at verða nýttur til. Eingin løgukarmur er fyri hetta í 2025.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Mettur kostnaður umleið kr. 54 mió. |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 / 2029 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Møgulig sparing |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at stovna sjálvstøðuga verkætlan nevnd "Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún", sum verður at fíggja av løgukarmi fyri 2026, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at hetta verður fíggjað av meirinntøkunum í 2025.

**Ískoyti**
Fyri at seta ferð á arbeiðið, at fáa fyrireikað høvuðsumvælingina av bygninginum í Steinatúni er neyðugt, umframt at stovna verkætlanina "Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún", eisini at peningur verður játtaður til hesa verkætlan til fyrireiking og projektering. Ásannandi, at slíkt arbeiði kann verða umfatandi er tað trupult at áseta neyva meting av neyðugari játtan. Mælt verður til at gera skipanaruppskot, sum tekur støðu til framtíðar nýtslu av bygninginum  og fara undir at detail prosjektering av klimaskerminum. Mett, at neyðugt er við 4 mió kr. til at arbeiða við hesum í fyrstu atløgu.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | Høvuðsumvæling av bygningi Steinatún | 4.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Uml. 54 mió kr. |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2029 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ikki kent enn |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla fíggjarnevndini til at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini. Harumframt at játta kr. 4 mió. kr. til verkætlan, sum verður at fíggja av meirinntøkum fyri 2024 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at ein bygginevnd verður sett eftir vanligum leisti, og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum í fyrstu syftu.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddi: Ongin

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddi: Ongin

Blankt atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Málið varð sostatt samtykt við aðru viðgerð við 8 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

# 233/25 Broyting í reglugerðini fyri útlutan av grundstykkjum til sethús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 155/25 | 25/03157-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 233/25 | 25/03157-2 |

**Upprunin til málið**
Galdandi reglugerð áleggur fólki, ið eiga íbúð at selja hana áðrenn tey kunnu fáa skeytið uppá grundstykki frá kommununi.

**Lýsing av málinum**
Ein grundregla í reglugerðini fyri útlutan av grundstykkjum í Tórshavnar kommunu hevur verið, at skilt verður millum tey, ið eiga íbúð, og so tey, ið eiga grundstykki, sethús, tvíhús ella raðhús. Soleiðis at skilja, at bert tey, ið onga fasta ogn eiga, og tey, ið eiga íbúð, hava kunnað skriva seg upp til lutakast um grundstykki.
Hugsanin hevur verið, at íbúðir eru annað slag av ogn enn hús, og í flestu førum minni enn hús, og tí hevur man ynskt, at tað skuldi vera gjørligt hjá fólki at flyta úr íbúð í hús, tá tørvur er á tí, og soleiðis stuðla undir einum ávísum dynamikki í bústaðarmarknaðinum.
Seinast reglugerðin bleiv broytt, var sett fram ynski um, at fólk, sum eiga raðhús eisini skuldi kunnað skriva seg upp til lutakast um grundstykki. Umsitingin mælti frá hesum vísandi til, at tað eru bygd nógv raðhús til familjur seinastu árini, sum eru størri enn nógv eldri sethús og tvíhús, so tað var torført at grundgeva fyri, hví fólk í raðhúsum skuldi fáa henda framíhjárætt, meðan ein familja, ið er vaksin úr einum lítlum sethúsum ella tvíhúsum, ikki skal fáa henda møguleika. Hóast alt er eitt raðhús ein ogn sum onnur hús við egnum matrikli og nakað av lendi uttanfyri, meðan ein íbúð er annað slag av ogn í einum felags bygningi.
Fíggjarnevnd og býráð góðkendi tó at fólk, sum eiga raðhús eisini skuldi kunnað skriva seg upp til lutakast um grundstykki. Í eini roynd at stýra gongdini ella forða spekulatión, var eisini samtykt at áseta í broyttu reglugerðina:

- Borgarar fevndir av a2 í pkt. 4, sum eiga íbúð ella raðhús, skulu hava selt hesa ogn, áðrenn tey fáa endaligt skeyti uppá grundøki.

Avleiðing av hesum er, at fólk, sum búgva í egnari íbúð ella einum raðhúsum og fáa tillutað eitt grundstykki frá Tórshavnar kommunu, fáa so harðar treytir, at tað nærmast er vónleyst gera skifti til sethús. Tí tey skulu selja sítt heim, og finna sær eitt leigumál í Tórshavnar kommunu, áðrenn kommunan vil geva teimum eitt skeyti uppá grundstykki, so tey kunnu fara undir at byggja sær eitt nýtt heim.

Altso í eini roynd at geva teimum, sum búgva í raðhúsum ein framíhjárætt fram um onnur, ið eiga hús í Tórshavnar kommuna at skriva seg upp til lutakast um grundstykki, hevur man gjørt støðuna hjá teimum, ið eiga íbúð munandi verri enn hon var frammanundan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús

**Upplýsingar frá umsitingini**
Snarskivan hevur fingið fyrispurningar frá fólki, sum eiga og búgva í íbúð, um tað veruliga er soleiðis at reglugerðin skal skiljast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla til at samtykt verður at bakka aftur til gomlu ásetingina um, at bert tey, sum eiga íbúð kunnu skriva seg upp til lutakast um grundstykki, og treytin um, at tey skulu selja áðrenn skeytið verður latið uppá ognina, verður strikað.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, samtykkir at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at halda fast í verandi reglugerð.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Atkvøtt varð um tilmæli, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri og fimm ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Sunnvá Dahl Høgfeldt.

# 234/25 Dagføring av innkeyps- og útboðspolitikki hjá Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 28/25 | 25/03158-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 234/25 | 25/03158-1 |

**Upprunin til málið**
Fyrsti innkeyps- og útboðspolitikkur varð samtyktur í fíggjarnevndini í november 2014. TK hevur síðani arbeitt miðvíst við at menna innkeyps- og útboðsøkið.

Í 2019 fekk TK útboðsportal og hevur hetta viðvirkað til enn meira gjøgnumskygni í útboðstilgongdini. Fleiri hundrað føroyskir veitarar eru skrásettir á portalinum, sum er nógv brúktur av stovnum og deildum í TK.

Mælt verður til at útboðspolitikkurin verður dagførdur.

**Lýsing av málinum**
Í samband við dagføring av útboðspolitikkinum er dentur lagdur á fylgjandi viðurskifti og broytingar til útboðspolitikkin:

- **Atlit til innkeyp – umhvørvi og CSR**

Dagføringin leggur í enn størri mun áherðslu á, at atlit skulu takast til umhvørvið í samband við kommunalt innkeyp

- **Broyting í upphæddum**

Markamótini fyri nær tilboð og útboð skulu umbiðjast eru broytt soleiðis: fyri keyp úr kr. 50.000 upp í kr. 1 mió., skulu minst tvey tilboð umbiðjast. Øll keyp omanfyri kr. 1 mió. skulu bjóðast út, rammusáttmálar íroknaðir. Markamótið var í 2014 800 tkr.

- **Útboðsportalurin**

Allar útboðskunngerðir og tilboðsfyrispurningar, sum fara av rakstrarjáttanini hjá TK skulu umvegis útboðsportalin hjá TK. Útboðsportalurin hjá TK er mentur í tráð við meginreglunum í útboðspolitikkinum hjá TK, at skapa gjøgnumskygni og tryggja, at innkeyp og útboð í TK eru professionel, óheft og rættvís.

- **Aðrar broytingar**

Aðrar smærri tillagingar til útboðspolitikkin er td. at atlit skal takast til, at veitarar eru skikkaðir, eitt nú, at hesir kunnu veita trygd og tænastu í Føroyum til vøruna teir selja. Orðing er sett inn um, at tilboðsfyrispurningar og útboðstilfar skal vera á føroyskum máli.

Endamálið við broytingunum er, at leggja dent á at keypa enn meira burðardygt og umhvørvis vinarligt. Í samband við broyting í upphæddunum, er talan um at taka hædd fyri prístalsvøkstri. Útboð eru ofta fyrisitingarlig tung at gera og umsita og tað er ikki altíð, at eitt útboð stendur mát við avslátturin/sparingina sum kemur av útboðnum. Viðvíkjandi útboðsportalinum er endamálið, at skipa øki betri, og at tryggja at veitarar bert hava eitt stað at venda sær í mun til innkeyp og útboð í TK og harvið skapa gjøgnumskygnið og álit hjá veitarum. Bert veitarar við føroyskum vtalið kunnu skráseta seg á útboðsportalinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórnin og váðaráðgevin mæla til, at taka við omanfyri nevndu broytingum í innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

# 235/25 Fíggjarætlan 2026, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 129/25 | 25/06020-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 163/25 | 25/06020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 208/25 | 25/06020-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 01.10.2025 | 107/25 | 25/06020-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 02.10.2025 | 57/25 | 25/06020-1 |
| 6 Heilsu- og eldranevndin | 02.10.2025 | 22/25 | 25/06020-1 |
| 7 Vinnunevndin | 29.09.2025 | 26/25 | 25/06020-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 141/25 | 25/06020-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 29.09.2025 | 62/25 | 25/06020-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.09.2025 | 62/25 | 25/06020-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 176/25 | 25/06020-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 235/25 | 25/06020-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðan viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hetta er ein sokallað teknisk framskriving av fíggjarætlanini 2025, sum er fyrsta stigið í sambandi við fyrireikingarnar og planleggingina av fíggjarætlanini 2026 hjá Tórshavnar Kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tekniska framskrivingin av fíggjarætlanini 2025 er grundað á ta vitan og teir upplýsingar, ið eru tøkir í løtuni, og tekniska framskrivingin kann býtast upp í hesar tríggjar høvuðspartar:

1. Frakskriving av kommunuskattinum og skattinum av eftirlønargjøldunum.
2. Framskriving av rakstrarútreiðslunum.
3. Virksemisbroytingar eftir 1. desember 2024, tá fíggjarætlanin fyri 2025 varð samtykt.

**Ad. 1: Framskriving av kommunskattinum og skattinum av eftirlønargjøldum**
Búskaparráðið metir í várfrágreiðing sínari, frá apríl 2025, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, fer at vaksa 5,5% í ársins prísum í 2026. Í játtanarkørmunum hjá landinum, eisini frá apríl í ár, verða landsskattainntøkurnar framskrivaðar við 4,5% í 2026.

Eftir at Búskaparráðið gjørdi sínar metingar til várfrágreiðingina eru útlitini hjá alivinnuni versnaði. Søluprísurin er farin niður um framleiðslukostnaðin, samstundis sum tøkan og útboðið av laksi á altjóða marknaðinum veksur. Í aðrar mátar valdar stór óvissa viðvíkjandi øllum búskaparligum forsøgnum, soleiðis sum støðan er í heiminum í løtuni.

Varisliga verður tí mett, at kommunuskatturin fer at vaksa 3,5% í 2026 samanborið við FÆ-2025.

Hetta er við óbroyttum skattaprosentið á 19% og óbroyttum barnafrádrátti á 9.000 kr.

Viðvíkjandi skattinum av eftirlønargjøldum, so metir Kommunufelagið, at skatturin av eftirlønargjøldum verður millum 5 og 10%, helst nærri 10%, hægri í 2026 enn í 2025. Varisliga verður tí mett, at skatturin av eftirlønargjøldum verður 5% hægri í 2026 samanborið við FÆ-2025.

**Ad 2: Framskriving av rakstrarútreiðslum**
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru býttar sundur í lønir og rakstrarútreiðslur annars. Tað eru bert lønarútreiðslurnar av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sum eru framskrivaðar í hesi fyrstu teknisku framskrivingini hjá kommununi. Lønirnar eru framskrivaðar við 3,25% frá FÆ-2025 til FÆ-2026. Hetta er sama framskriving av lønunum sum í játtanarkørmunum hjá landinum frá apríl í ár.

**Ad. 3: Virksemisbroytingar**
Virksemisbroytingarnar snúgva seg um lógarbroytingar og býráðssamtyktir eftir at fíggjarætlanin fyri 2025 varð samtykt umframt avleiddar broytingar í rakstrinum frá avhendaðum íløgum. Samanlagt kosta virksemisbroytingarnar, eftir at fíggjarætlanin fyri 2025 var samtykt, 17.187 t.kr. Størstu virksemisbroytingarnar stava frá øktum virksemi undir § 6, Teknisk mál, og hetta er serliga av nógv øktum avleiddum rakstrar virksemi, nú nýggi innkomuvegurin við íbindingum verður liðugur. Næst størsta virksemisbroytingin er á § 3, Børn og ung, 2.880 t.kr., og kemst hon av, at foreldragjaldið á dagstovnum varð lækkað úr 27% niður á 25% tíðliga í ár. Harumframt hava lógarreguleringar havt við sær fleiri rakstrarútreiðslur við sær á fólkaskúlaøkinum.

**Mett úrslit av rakstrinum í 2026 eftir tekniskar framskrivingar**
Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini av FÆ-2025, sum er fyrsta grundarlagið undir fíggjarætlanini 2026 vaksa inntøkurnar 3,51% og rakstrarútreiðslurnar 4,02%. Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini vaksa rakstrarútreiðslurnar sostatt meira enn mettu inntøkurnar. Tórshavnar Kommuna hevur vanliga sett sær sum innanhýsis mál, at rakstrarútreiðslurnar skulu vaksa minni enn mettu inntøkurnar.

Í hesi teknisku framskrivingini eru 245.187 t.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2026, tá ið Tórshavnar Havn er tikin burtur úr framskrivingini.

**Skjøl**
-Tíðarætlan Fíggjarætlan 2026
-Teknisk framskriving av FÆ-2025

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2026 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 12. mai 2025. Síðan tá hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2026.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2024 | Ætlan 2024 | Ætlan 2025 | Ætlan 2026 | Broyting 2025/2026 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.090.759 | 1.011.886 | 1.099.983 | 1.143.982 | 4,00% | 43.999 |
| 20601 | Felagsskattur | 74.695 | 58.000 | 58.000 | 58.000 | 0,00% | 0 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.079 | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 100,0% | 1.000 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 220.513 | 209.753 | 231.376 | 265.000 | 14,5% | 33.624 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.298 | 35.704 | 35.322 | 34.000 | -3,7% | -1.322 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 981 | 0 | 800 | 800 | 0,0% | 0 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 265 | 0 | 200 | 200 | 0,0% | 0 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.424.591** | **1.316.343** | **1.426.681** | **1.503.982** | **5,4%** | **77.301** |
| | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 102.133 | 100.713 | 106.920 | 112.784 | 5,5% | 5.864 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 334.724 | 321.960 | 354.202 | 369.086 | 4,2% | 14.884 |
| §3 | Børn og ung | 252.718 | 235.494 | 256.354 | 272.073 | 6,1% | 15.719 |
| §4 | Undirvísing | 56.784 | 56.538 | 57.753 | 62.466 | 8,2% | 4.713 |
| §5 | Mentan og frítíð | 79.324 | 70.350 | 81.001 | 83.036 | 2,5% | 2.035 |
| §6 | Teknisk mál | 164.446 | 156.688 | 167.051 | 174.969 | 4,7% | 7.918 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 104.053 | 90.983 | 102.084 | 105.619 | 3,5% | 3.535 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.094.182** | **1.032.726** | **1.125.365** | **1.180.033** | **4,9%** | **54.668** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -36.939 | -36.939 | -36.985 | -37.975 | 2,7% | -990 |
| | **Rakstur íalt** | **1.057.243** | **995.787** | **1.088.380** | **1.142.058** | **4,9%** | **53.678** |
| | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 34.039 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.140 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **36.178** | **32.000** | **32.000** | **32.000** | **0,0%** | **0** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **331.169** | **288.556** | **306.301** | **329.925** | **7,7%** | **23.623** |
| | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 6.141 | 13.217 | 10.962 | 8.867 | -19,1% | -2.095 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.043 | 5.037 | 7.250 | 43,9% | 2.213 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 590 | 0 | 0 | 0 | 0,0% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | 0 | 0 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **5.551** | **18.260** | **15.999** | **16.117** | **0,7%** | **118** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **325.618** | **270.296** | **290.303** | **313.808** | **8,1%** | **23.505** |
| | | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **15.900** | **23.033** | **22.733** | **20.003** | -12,0% | -2.730 |
| | **Avdráttir TH** | **14.484** | **15.873** | **15.874** | **15.873** | 0,0% | -1 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **295.234** | **231.390** | **251.696** | **277.932** | **10,4%** | **26.236** |
| | | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **272.779** | **215.367** | **235.622** | **263.080** | **11,7%** | **27.458** |

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

**Dagførd meting av búskapargongdini**
Høvuðsniðurstøðunar í nýggjstu frágrieðingini hjá Búskaparráðnum, sum varð løgd fram tann 1. september, eru stórt sæð tær somu sum í várfrágreiðingini. Búskaparráðið metir nú, at vøksturini í BTÚ í árligum prísum verður nakað størri í 2026 enn mett var í várfrágreiðingini, men tað kemst av, at Búskaparráðið hevur niðurskrivað metingina fyri vøksturin í 2025, tí laksaprísirnir eru lækkaðir meira enn væntað í ár. Tí verður metingin fyri búskaparvøksturin í leypandi prísum frá 2025 til 2026 tað størri.

Altjóða óvissan er framvegis stór, men renturnar eru lækkaðar og tað eru ikki útlit fyri, at rentunrnar hækka aftur í nærmastu framtíð. Tí er reallønin vaksin og útlit eru fyri størri vøkstri frameftir.

Gongdin og samansetingin av fólkatalinum í kommununi hevur grundleggjandi týdning fyri, hvussu kommunan skal útbyggjast og mennast frameftir.

Eingin dagførd fólkatalsframskriving er tøk í løtuni, men kommunan hevur gjørt eina meting av fólkatalinum fram til 2030. Metingin er lýst niðanfyri og eigur sjálvandi at vera tikin við neyðugum fyrivarni.

Tilflytingin til suðurstreymoyar øki hevur ligið um 150 persónar um árið tey seinastu 10 árini, men í fjør fluttu bert 48 persónar til suðurstreymoyar øki. Um tilflytingin fer at koma upp aftur á 150 og føðitíttleikin kemur upp aftur á 2,1, so væntar Búskaparráðið, at fólkatalið í Tórshavnar kommunu fer at vaksa stútt fram til 2030, tá ið tað væntandi fara at vera umleið 24.500 borgarar í Tórshavnar kommunu.

Um hugt verður nærri eftir fólkasamansetingini, so fer talið av børnum í barnagarðsaldri og í fólkaskúlunum at verða rættiliga støðugt í Tórshavnar kommunu frá 2026 og fram til 2030. Í mun til restina av landinum, so fer talið av teimum 25-44 ára gomlum at vaksa í Tórshavnar kommunu. Talið av pensjónistum fer at vaksa skjótari og fyrt tey, sum eru omanfyri 80 ár, fer talið at vaksa enn skjótari.

At talið av teimum eldru fer at vaksa lutfalsliga meira enn fólkatalið annars er ikki ein óvæntað niðurstøða í hesi framskrivingini hjá Búskaparráðnum. Í flestu londum verður sagt tað sama. Tað fara at verða lutfalsliga fleiri eldri samanborið við tey yngru komandi árini.

**Dagførd inntøkumeting**
Inntøkumetingin er dagførd við teimum upplýsingum og fortreytum, sum vórðu galdani í september 2025.

*Kommunuskattur*
Við støði í teimum upplýsingum og tí vitan, sum var tøk í september 2025, verður kommunuskatturin mettur at hækka 4% frá 2025 til 2026. Kommuskatturin hækkar sostatt úr 1.099.983 t.kr. í FÆ-2025 upp í 1.143.982 t.kr. í hesum uppskotinum.

*Húsaleiguskattur*
Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026. Í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 varð húsaleiguskatturin settur til 1 mió. kr. Húsaleiguskatturin verður sostatt 1 mió. kr. hægri í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2025.

*Felagsskattur*
Í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 varð búskettarað við 58 mió. kr. í felagsskatti. Av tí, at inntøkurnar frá felagsskattinum hava víst seg at kunna sveiggja nógv frá ári til ár, verður búsketterað við somu inntøkum frá felagsskattinum í 2026, sum upprunaliga varð búsketterað við í FÆ-2025.

*Skattur av eftirlønargjøldum*
Í dagførdu metingini verður mett, at skatturin av eftirlønargjøldum fer at verða munandi hægri í bæði 2025 og 2026 enn upprunaliga mett. Hetta kemst serliga av stóru lønarhækkingunum í hesum sáttmalaskeiðnum. Eftirlønarskatturin fer tí úr 231.376 t.kr. í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 upp í 265.000 t.kr. í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026.

*Veiðigjald*
Fyrstu ferð komunurnar fingu part av veiðigjaldinum var í 2025, og mett var, at Tórshavnar kommuna fer at fáa 800 t. kr. í veiðigjaldi í ár. Mett verður, at Tórshavnar kommuna fer at fáa á leið somum upphædd í 2026.

*Tøkugjald*
Fyrstu ferð komunurnar fingu part av tøkugjadinum var í 2025, og mett var, at Tórshavnar kommuna fer at fáa 200 t. kr. í tøkugjaldi í ár. Mett verður, at Tórshavnar kommuna fer at fáa á leið somum upphædd í 2026.

*DIS, FAS og frádráttir*
Inntøkurnar á hesi kontuni vera mettar at fara at verða eitt vet minni í 2026 enn í upprunaligu fíggjarætlanini í 2025. Inntøkurnar verða mettar til 34.000 t.kr. í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026 í mun til góðar 35.000 t.kr. í FÆ-2025.

*Samlaðu inntøkurnar*
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu tí 5,4% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2025.

**Rakstrarútreiðlsur**
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,4%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 4,9%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2024 til 2025. Hetta komst fyrst og fremst av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men løgtingssamtyktin um lønarlyft til ávísar fakfelagsbólkar hevði eisini sína ávirkan á vøksturin í lønarútreiðslunum hjá kommununi í 2025.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá ið nýggir sáttmálar skulu gerast fyri tey komandi tvey árini. Hetta, saman við tí, at renturnar og prísvøksturin er lægri nú enn tá verandi sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum vórðu gjørdir, benda á, at vøksturin í samlaðu lønarútreiðslunum hjá kommununi ikki verður líka stórur í 2026 sum í 2025.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2026.

**§ 1 Kommunal fyrisiting:**
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 5,5%, svarandi til góðar 5,8 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum. Harumframt fer ein góð 1 mió. kr. til løgtingsvalið og fólkatingsvalið, sum vera í 2026.

**§ 2 Almanna- og heilsumál:**
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,2%, svarandi til smáar 15 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir eru lagdar afturat. Tilhaldið í Tórsgøtu er flutt á egið rakstrarstað 2740 Tilhaldið í Tórsgøtu frá ávikavist 2720 Heilsuhúsið (rakstur) og 2722 Tilboð (lønir og brúkaragjøld).

Sosiala deild hækkar nakað. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men har eru nøkur gjøld løgd inn fyri foreldraførleikakanningar og arbeiðsroyndir til tey ungu. Somuleiðis eru nøkur tænastugjøld hækka so sum vistarhald og fundarsamsýningar til barnaverndarnevndina.

**§ 3 Børn og ung:**
Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 6,1%, svarandi til 15,7 mió. kr. Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Í 2026 fer vøksturin í rakstrinum serliga til, at stovnsgjaldið fyri vøggustovubørn verður óbroytt í 2026 í mun til 2025, umframt annan vøkstur í rakstrinum av stovnunum og leigugjøldum. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønartrin og leiðslan er tikin úr normeringini.

**§ 4 Undirvísing:**
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 8,2%, svarandi til 4,7 mió. kr. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Fløtum, Eysturskúlan, Sankta Frans skúla, Skúlan á Argjahamri og Skúlan við Løgmannabreyt.Talan er um stóran árgang. Ein eyka 1. flokk í Sankta Frans skúla og ein

forskúla á Argjahamri. Hartil er gjald fyri heildartilboð á skúlanum á Trøðni stórur parturin av vøkstrinum á grein 4, t.e. er konta 4142, sum kostar 2 mió. kr. eyka í 2026.

**§ 5: Mentan og frítíð:**
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 2,5%, svarandi til 2 mió. kr. Nýggja svimjihøllin við langhyli í Gundadali fer við størsta partinum av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum á mentanar og frítíðarøkinum í 2026. Harnæst er tað ítrottaranlegg og býarbókasavn, sum hava við sær ein vøkstur í rakstrarútreiðslunum.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað. Bókasavnið hevur mist stóran part av stuðlinum frá landinum í sambandi við nýggju bókasavnslógina. Fyri svimjihøllina verður mett, at talið av ársverkum liggur á einum nøktandi støði. Inntøkugrudnarlagi hjá Ítróttarannlegg er munandi versna síðan við Tjarnir lat upp, hartil eru nýggj høll í Kaldbakk latin upp. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

**§ 6: Teknisk mál:**
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,7%, svarandi til smáar 8 mió.

Infrakervið í Tórshavnar kommunu er útbygt munandi seinastu árini, t.d. Havnavegurin, tilhoyrandi tunnilin og stóru útskykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum. Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa.

Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 verður 3,6 mió. kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum, fríðkan og viðlíkahald, røkt av kirkjugørðum og verkstaðið hjá kommununi vaksa millum 4 og 5%, mest orsaka av lønarvøkstri og príshækkingum annars.

**§ 7: Kommunal virkir:**
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 3,5%, svarandi til 3,5 mió.

Á grein 7 verður mett, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 1 mió. kr. hægri í 2026 enn tær vóru í 2025. Umleið 38 mió. kr. í 2026 samanborið við 37 mió. kr. í 2025.

Kommunala brennistøðin kemur at kosta Tórshavnar kommunu 4,7% meira í rakstri í 2026 enn í 2025, og brandstøðin kemur at kosta 6,2% meira í rakstri í 2026 enn í 2025.

**Skattafíggjaðar íløgur**
Í hesum uppskotinum eru góðar 263 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna er farin undir at byggja nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, og undirvísing. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 29. september 2025:** Framlagt.

**Vinnunevndin 29. september 2025:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. september 2025:** Framlagt

**Mentamálanevndin 01. oktober 2025:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 02. oktober 2025:** Framlagt.

**Heilsu- og eldranevndin 02. oktober 2025:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til fyrstu viðgerð.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti, men mælir til at ávikavist hækka barnafrádráttin og/ella lækka kommunuskattin.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Sunnvá Dahl Høgfeldt.

Málið beint til aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. oktober 2025 | Blað nr.: 734 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

## 236/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 85/25 | 25/00161-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 118/25 | 25/00161-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 98/25 | 25/00161-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 130/25 | 25/00161-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 175/25 | 25/00161-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 166/25 | 25/00161-1 |
| 11 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 209/25 | 25/00161-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 183/25 | 25/00161-1 |
| 13 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 236/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**

Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Býráðsfundur<br>23. oktober 2025 | Blað nr.: 735 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Fremlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Mánaðarroknskapurin fyri august 2025 er um teldupost 18. september 2025 sendur fíggjarnevndarlimunum til góðkenningar.

Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen hava góðkent roknskapin.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið av skrá.

## 237/25 Heimild til byggimálsdeildina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 81/25 | 25/05840-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 237/25 | 25/05840-2 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá byggimálsdeildini um at sleppa at avgreiða matrikulmál uttan nevndarviðgerð.

**Lýsing av málinum**
Kommunan fær rættuliga nógvar umsóknir um marknaumskipan og líknandi mál um matrikkulering.

Nú býráðið fer í summarfrí frá juni til september, verður rættuliga long tíð hjá umsøkjarum at fáa svar uppá teirra umsóknir. Tí verður biðið um:

1. at byggimálsdeildin fær heimild til sjálv at avgreiða øll smærri matrikulmál, uttan at hesi verða løgd fyri nevnd.

2. at byggimálsdeildin fær heimild til sjálv at avgreiða umsóknir um byggiloyvi til smærri bygging, upp til sethús, tvíhús og líknandi, har biðið verður um undantaksloyvi av lítlum týdningi, uttan at hesi verða løgd fyri nevnd.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, er ásett í § 20, at øll sundurbýtismál skulu sendast viðkomandi kommunustýri til ummælis.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin gevur byggimálsdeildini heimild til at avgreiða øll smærri matrikulmál og smærri byggimál við undantaksloyvi av lítlum týdningi, uttan at hesi verða løgd fyri nevnd, og at heimildin er galdandi fram til 1. september 2025.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum, grundað á at málini kundu verið send út við telduposti til limirnar.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Umrøtt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen | Birgir Nielsen |
| | Sunnvá Dahl Høgfeldt | |